Nr. 1 • Apríl 2009

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið




## Nýbrot:
## Fakfeløg geva út blað í felag

## ÚTGEVARI

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

## BLAÐNEVND

Eyðstein Djurhuus (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Páll Hansen.
Jóan Petur Patursson.

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ

Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

## FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

## BLAÐHALD

Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
**bladhald@midogmagn.fo**
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

## ENDURGEVING

Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
**www.mf.fo**
**www.fsn.fo**

## UMSITING

Snæbjørn í Dali
info@midogmagn.fo

## PRENT

Spf. Gramar | www.gramar.fo

UPPLAG: 2.000




# Samstarv gevur nýggjar møguleikar

MIÐ & MAGN er limablað hjá Maskinmeistarafelagnum og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Flestu størru fakfeløg geva limabløð út, og endamálið er sjálvsagt at kunna limirnar um viðkomandi mál.

Feløgini hjá okkum, eru hvør sær í minna lagi til egna blaðútgávu, men tá vit fara í gongd við hetta saman, verður uppgávan lættari. Eisini vænta vit, at blaðið gerst meira fjøltáttað og áhugavert fyri limirnar í báðum feløgunum.

Feløgini hava sum heild sama virkisøki. Vit umboða skipsyvirmenn á bæði fiski- og handilsskipum. Maskinmeistarafelagið hevur eisini ræ ttuliga nógvar limir, sum starvast á landi. Feløgini hava tilsamans meira enn 1.000 virknar limir, harumframt 750 hvílandi limir. MIÐ & MAGN verður eisini sent til stovnar, felagsskapir og onnur áhugaði. Samlaða upplagið er 2.000 eintøk, so tað áliggur ein skylda á okkum, at MIÐ & MAGN hevur eina ávísa dygd.

Ein íognarsáttmáli er gjørdur millum feløgini um MIÐ & MAGN, ein blaðnevnd við tveimum umboðum fyri hvørt felag er sett. Avtala er gjørd við Snæbjørn í Dali um at samskipa tey praktisku viðurskiftini. Sjálvt um MIÐ & MAGN gevur feløgum eyka arbeiði og útreiðslur, so eru vit farnir ígongd við góðum treysti. Vit vóna, at limirnir fara at taka væl ímóti MIÐ & MAGN.

Fakfelagsarbeiði er ikki bert sáttmálasamráðingar og innheinting av lønarkrøvum. MIÐ & MAGN skal tí eisini greiða frá øðrum, sum vit fáast við. Tað er ikki ætlanin, at blaðið bert skal brúkast til fakfelagspropaganda, men heldur til at lýsa viðkomandi viðurskifti, við opnum sinni. Tí hava vit valt, at brúka royndar tíðindamenn, til at skriva greinar til blaðið. Smærri tíðindastubbar skriva vit sjálvir.

Øll byrjan kann vera torfør, og okkum tørvar royndir á hesum øki. Møguliga kunnu koma broytingar í sniði og innihaldi ta fyrstu tíðina. Endamálið er at veita eina betri limatænastu, tí er neyðugt at limir okkara koma við viðmerkingum og góðum hugskotum til MIÐ & MAGN.

Eftir ætlan skal MIÐ & MAGN koma út fýra ferðir um árið.

Vit **Miða** ímóti at **Megna** at fáa næsta blaðið út í juli mánað.

Vegna **Føroya Skipara- og Navigatørfelag** og **Maskinmeistarafelagið**

*Eyðstein Djurhuus* ábyrgdarblaðstjóri

# Innihald



Samstarvsavtala við Søfartens Ledelse s. 29



Rock og Rock Trawldoors s. 34


| | |
|---|---|
| Samstarv gevur nýggjar møguleikar | 2 |
| Tommy rekur fyri FAS | 4 |
| Sporførisskipanin er ár framman fyri sína tíð | 6 |
| Landgrunssjógvurin er uppvakstrarøki hjá toski | 8 |
| Páll skal leiða Maskinmeistarafelagið tvey ár afturat | 10 |
| Umhvørvisráðstevna | 13 |
| Navigatørurin í brennideplinum | 14 |
| Fotokapping | 14 |
| Føroyskt Maritimt Forum stovnað | 15 |
| Tann fyrsti litti eisini tann fyrsti grøni | 16 |
| Kollvelting í bila- og vindmylluídnaðinum | 18 |
| Obama skumpar undir elbilarnar | 20 |
| 500 vindmyllur fyri 20 milliardir krónur | 21 |
| Páll Hansen formaður í Maskinmeistarafelagnum | 22 |
| Navnið „Mið & Magn“ | 25 |
| Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum | 26 |
| Samstarvsavtala við Søfartens Ledelse | 29 |
| Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum | 30 |
| Ongin má gerast sjúkur av sínum arbeiði | 33 |
| Nú kreppan herjar | 33 |
| Rock og Rock Trawldoors í Vági hava úr at gera | 34 |




Tann fyrsti litti eisini fyrsti grøni s. 16



Páll skal leiða Maskinmeistarafelagið s. 10



Navnið „Mið & Magn s. 25



Føroyskt Maritimt Forum stovnað s. 15



# Tommy rekur fyri FAS

Tommy Petersen

*Við nýggjastu skattabroytingini fyri FAS, tykjast friður og nøgdsemi at valda yvir Føroysku Altjóða Skipaskránni. Og við øðrvísi bygnaði og dugnaligum stjóra, eru nú umsíðir verulig útlit fyri, at tað fer at eydnast at reka nøkur góð reiðarí inn um landoddarnar, so nakað fer at síggjast aftur í samfelagsbúskapinum. Fyrstu ábendingarnar fáa vit longu um ein til tveir mánaðir, tá donsk reiðarí fara at boða frá sínum áhuga fyri skipanini.*

Ein føroysk farmavinna saman við eini altjóða skipaskráseting var longu í áttatiárunum mett at kunna gerast ein berandi vinna í føroyska búskapinum. Eftir tær fyrstu royndirnar við Føroysku Altjóða Skipaskránni sást kortini skjótt, at tað var ikki sum at siga tað at bjóða teimum stóru av. Føroyska skipanin var ov stirvin, metingin av føroyska umdøminum lá til eitt flagg í hálvari stong og í nógv ár hava vit sæð eina til- og frámelding av hálvgomlum farmaskipum.

Fleiri ferðir hava glottar verið at hóma við politiskum lyftum um at gera ábøtur á skipanina. Vinnan hevur gingið undan, men tað tykist, sum nógvir av politikarunum ikki hava fatað, at skal skipanin vera kappingarfør, er neyðugt við minst líka góðum sømdum, sum grannalandaskipaninar bjóða.

Tað eru bara fáir mánaðir síðani, at tað illa loysti seg at vera mynstraður við einum FAS-skipi, tí á botnlinjuni vóru 6000-7000 krónur minni eftir hjá føroyskum FAS-siglandi, sammett við tað, sum grannalondini kunnu bjóða. Sjálvt ein útlendingur, sum sigldi í FAS-skipanini, fekk 4.500 krónur netto meira um mánaðin, enn ein føroyingurin við sama førleika á somu brúgv.

Tá hóttu føroysk reiðarí og feløg við, at hendu ikki broytingar, rýmdu 30 skip úr FAS. Formaðurin í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, Anfinn V. Hansen, segði, at føroyska skattaskipanin var størsta forðingin fyri, at FAS virkaði sum ein heildarskipan. Hann tosaði um eina beinleiðis diskriminering av føroyskum manningum.

Stutt sagt hevur politiska undirtøkan verið ov lítil til at friður fekst um skipanina, so FAS kundi fara eftir teimum stóru fiskunum. Lógarverkið fyri skipanina var somuleiðis spjatt við vantandi gjøgnumskygni. Tey, sum høvdu brúk fyri tænastum, máttu fara á fimm til sjey støð, ístaðin fyri at alt varð savnað á einum stað.

## Trýst elvdi til lógarbroyting

Men í 2008 hendi nakað. Fleiri ráðstevnur vóru um shipping og Maritimt Forum varð stovnað. Øll vinnan hevur tikið stig til hendan Sjóvinnupallin, og talsfólkini hava dugað væl at borið boðskapin fram. Meðan fyrireikingarnar vóru at stovna Sjóvinnupallin, bleiv Tommy Petersen settur sum stjóri í FAS, samstundis sum

umsitingin av skipanini varð samansjóðað á Skráseting Føroya.

Trýstið frá vinnuni á politisku skipanina gjørdi, at skattligu avlagingarnar fyri føroyingar í FAS vóru tiknar av. Orsøkin til, at føroyingar leingi høvdu minni eftir av nettolønini, enn útlendsku starvsfelagaðarnir, var at føroyingar fingu 5-7 prosent minni í afturbering, enn tað, sum útlendingar á somu skipum tilsvarandi fingu í sínum skipanum.

Lógarbroytingin 1. januar í 2009 førdi við sær, at meðan reiðaríini framman undan høvdu fingið 28 og seinni 30 prosent í afturbering, so fáa tey nú 35 prosent endurgoldið. Sagt á annan hátt, rinda sjómenn undir FAS 35 prosent í skatti, men av tí, at hesir sjómenn eftir føroysku skipanini rinda 35 prosent skatt í Føroyum, mugu reiðaríini leggja 35 prosent oman á lønina. Hesi 35 prosentini fáa reiðaríini so afturborið frá føroyska skattavaldinum.

Munurin millum donsku DIS-skipanina og FAS er, at DIS er ein nettoskattaskipan og tann føroyska ein nullskattaskipan. Ein sjómaður í DIS fær nettolønina á kontuna og skal ongan skatt rinda. Sjómaðurin í FAS fær eina bruttoløn, sum hann rindar 35 prosent av í skatti.

Tað er tilvitað, at føroyingar hava valt eyka pappírsarbeiði við skattligu viðurskiftunum. Tá ein føroyskur sjómaður fer uttanlands, er tað ein fyrimunur, at tað í hansara pappírum sæst, at hann hevur goldið skatt í Føroyum.

## Nú er at reka

Maritimt Forum varð stovnað, tí felagsskapurin heldur, at shipping helst er tann vinna, sum skjótast kann geva føroyska samfelagnum nýggjar inntøkur. Og strategiin hjá Tommy Petersen og FAS er saman við vinnuni og Maritimt Forum at marknaðarføra boðskapin um FAS á ein slíkan hátt, at skipanin gerst áhugaverd og álítandi, uttan at reypa av, at Føroyar eru eitt skattaparadís.

Vinnan hevur leingi lagt dent á, at lógargrundarlagið undir FAS í framtíðini ikki mátti vera ávirkað av títtum, kappingaravlagandi broytingum. Hetta er tikið til eftirtektar og FAS-løggávan virkar nú sum ein samlandi lóg, har øll viðurskifti, sum ávirka FAS, verða savnað. Sambært FAS-stjóranum er tekniska umsitingin í lagi og allar aðrar tænastur verða røktar til fulnar.


*Óla Hans Hammer Olsen*

## Fleiri reiðarí vísa áhuga

Tommy Petersen sigur, at av teimum 16 stóru og smáu reiðaríunum, sum FAS um miðjan februar bjóðaði til kunnandi fundar í Danmark, hevur helvtin svarað aftur, at tey eru áhugað í framhaldandi samráðingum um skráseting í FAS. Talan er um reiðarí, sum hava úr 6 upp í 100 skip. Um ein ella tveir mánaðar vita vit, hvussu nógv fyrsti raksturin gevur. Síðani verður farið til Norra og víðari til onnur evropeisk lond.

-Vit fara eftir nisjum sum eitt nú hjálparskipum í frálandavinnuni, men vit vilja sanniliga eisini gera okkum áhugaverd fyri øðrum reiðaríum, tí vit halda, at føroyska skipanin hevur kappingarfyrimunir fram um aðrar skipanir. Fleiri skipasløg kunnu fáa trupulleikar í evropeiskum skipaskráum, tí treytirnar fyri altjóða sigling fara at herðast, soleiðis at sigling innanhýsis í ES ikki verður roknað sum altjóða sigling. Skip í FAS fáa ikki somu trupulleikar, tí sigling frá uttanveltaða flagglandinum Føroyar verður roknað sum altjóða sigling, sigur Tommy Petersen.

Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum, Eyðstein Djurhuus, er sum heild nøgdur við skipanina, nú skattligu viðurskiftini eru dagførd. Men hann er greiður um, at manningafeløgini støðugt mugu meta um, hvat bruttolønin skal vera, soleiðis at nettolønin við DIS og NIS er sambærlig.

Eyðstein Djurhuus sigur, at gongdin í dag er tann, at yvirmannatalið í fiskiflotanum minkar, meðan alsamt fleiri føroyskir yvirmenn fara við farmaskipum og frálandaskipum.

-Men vit eiga ikki at gera skipanina ov opna, tí við sosialari dumping kann umdømið hjá føroyska flagginum koma í vanda, sigur hann, og sipar til Topaz-málið.

## Fyrst virka – so inntøkur

Í beinleiðis inntøkum er tað bara skrásetingargjaldið, sum gevur inntøkur í landskassan av FAS. Allar hinar inntøkurnar koma frá avleiddum vinnum og tænastum. Leysligt roknistykki sigur, at við donskum viðurskiftum sum grundarlag, kann peningarenslið gerast tvær milliardir.

Men tað nyttar einki at tosa um hundraðtals milliónir, fyrr enn FAS hevur prógvað, at útlendsk reiðarí sýna føroysku skipanini álit og áhuga. Vit virka á einum frælsum marknaði. Og fáa vit ikki alt inn um landoddarnar í fyrsta umfari, mugu vit læra av mistøkum og síðani herja á aftur. Halda vinnan og politikararnir nú somu kós, fer fyrr ella seinni at renna í kassan.

Skrivað: Helgi Jacobsen

Nevndin í Maritimt Forum:
Óla Hans Hammer Olsen, Eyðstein Djurhuus, Sámal Siversen, Sjúrður Gudjónsson og Leivur Mohr

# Sporførisskipanin er á

*Ein tann fyrsta verkætlanin, sum tá nýstovnaða Bitland fór í holt við í 2003, var at menna eina føroyska sporførisskipan til fiskivinnuna. Skipanin, sum skal seta teldutøkar lyklar á øll liðini í vinnuni, verður sett í verk kring landið í summar. Men tað ber longu nú til at staðfesta, at føroyingar á hesum øki eru fleiri ár frammanfyri aðrar tjóðir, sum brúka nógvar pengar upp á at menna líknandi skipanir.*



*Steinbjørn í Dali brennur fyri Føroya Sporførisskipan. Skipanin, sum m.a. skal samantvinna øll framleiðsluliðini í føroyskari fiskivinnu, er tann fremsta í øllum heiminum í løtuni.*
*Mynd: Leif Láadal*

Vit eru í 2012. Vit eru umborð á einum føroyskum ísfiskatrolara. Á brúnni tosa skiparin og maskinmeistarin um góða fiskiárið 2010.

– Tað var nú løgið, at vit fingu so nógv fyri serliga hýsuna hetta árið, sigur maskinmeistarin.

– Ja, tann prísurin gjørdi, at árið hjá okkum bleiv heldur betri enn hjá nógvum øðrum skipum, leggur skiparin afturat.

– Tað kundi verið stuttligt at hugt í skipanina fyri at sæð, hvar hýsan endaði, sigur maskinmeistarin.

– Tað er eingin trupulleiki, svarar skiparin aftur, og er longu í gongd við at tøppa loyniorðið inn í telduna.

Telduskíggin letur seg síðani upp, sum ein risastór logbók við alskyns upplýsingum um alt, sum ísfiskatrolarin hevur gjørt seinastu árini. Har sæst akkurát, hvar fiskurin varð fiskaður í 2010, hvørji sløg vóru í hvørjum háli, hvør prísurin var, tá ið fiskurin varð seldur, um sølan fór fram í Føroyum ella uttanlands, hvør keypti fiskin, hvat hann bleiv framleiddur til, hvør keypti hann uttanlands, og millum øll liðini ber eisini til at síggja, hvør ið hevur flutt fiskin úr einum staði í annað.

Nú er talan her um eina framtíðarsøgu, men hon er kortini ikki meira framtíð enn so, at skipanin, sum teir báðir yvirmenninir hyggja at á brúnni, er á gáttini. Hon er enntá somikið nær, at um alt gongur eftir ætlan, so gongur ikki long tíð, áðrenn Føroya

# r frammanfyri sína tíð

Sporførisskipan kann bjóða skipum og bátum og teimum, sum fáast við at selja fisk og at framleiða burturúr fiski, eina framkomna teldutøka tøknifrøðiliga ketuskipan, sum byggir á øll tey kendu liðini, sum frammanundan eru í fiskivinnu og fiskaframleiðslu.

## HEVUR SKUND

Steinbjørn í Dali gevur sær góða tíð, tá hann skal forklára um Føroya Sporførisskipan. Hann hevur roynt tað fyrr, og so hoyrist á honum, at hann ikki er heilt óvanur við at undirvísa. Og gleðin við sporførisskipanini er týðilig, tó at hann heilt vist hevði kunna hugsað sær, at hon var komin nøkur fet afturat.

– Eg tosaði herfyri við ein norskan granskara, og tá eg hevði fortalt honum, hvussu føroyska sporførisskipanin hongur saman, segði hann eitt sindur til stuttleika, at tað var keðiligt, at vit høvdu ment eina slíka skipan, tí hann hevði ætlað sær at granskað í evninum í fleiri ár, fortelur Steinbjørn í Dali.

Og norski granskarin hevði havt góðar møguleikar at granskað, tí norðmenn hava sett millum 40 og 50 milliónir krónur av, júst til at menna eina teldutøka sporførisskipan til fiskivinnuna.

-Sum er, eru vit í Føroyum tó væl frammanfyri, men um ikki Føroya Sporførisskipan fær neyðugu karmarnar – serliga teir fíggjarligu – verða vit afturúrsigld, sigur Steinbjørn í Dali.

Skipanin hevur higartil kostað tvær milliónir krónur, og hon fer at kosta tríggjar, tá hon er heilt liðug.

## BESTU MARKNAÐIRNAR

Føroya Sporførisskipan kann ikki tryggja, at føroyingar fara at fáa betri prís fyri fiskin í framtíðini, men Steinbjørn í Dali ivast ikki í, at ein slík skipan kann tryggja betri atgongd til teir bestu útflutningsmarknaðirnar, og í longdini er heldur ikki óhugsandi, at tann, sum hevur ta bestu skjalpróvanina, fær tann besta prísin.

– Kundarnir krevja meiri og meiri skjalprógvan, og ein slík skipan sum hendan kann lætt og einfalt tryggja, at kundin fær atgongd til allar upplýsingar, sum hava við vøruna at gera, fortelur Steinbjørn í Dali og leggur afturat:

– Skipanin kann enntá víðkast so hvørt sum tøkniligu møguleikarnir víðkast, og eitt nú teldutøk on-line menukort, ið siga alla søguna um fiskin, sum ein matstova borðreiðir við, eru ikki so langt úti í framtíðini.

Har kunnu fólk so sita kring allan heim, og blaða ígjøgnum teldu-menukortið og lesa, at stokta hýsan, sum tey fara at fáa um eina løtu, er fiskað sunnanfyri Føroyar í kanska heimsins reinasta havumhvørvi av einum ísfiskatrolara, hvørs skipari hevur 20 ára royndir á brúnni og hvørs maskinmeistari er fyrrverandi yvirmaður hjá Maersk.

Í hesum umhvørvistíðum kann leggjast afturat, at skipanin eisini kann víðkast til at telja upp Co²-útlát ígjøgnum virðisketuna.

Skrivað: Leif Láadal

### Tíðarætlan

*Føroya Sporførisskipan* verður fyrstu ferð umrødd á Bitstovu í oktober 2003.

- 1. januar 2004 verður farið at arbeiða miðvíst við verkætlanini í Bitland-høpi.
- Undanverkætlan verður sett í gongd í november 2004, og á samgongufundi í mars 2005 fær ætlanin politiska undirtøku.
- Í februar 2006 verður P/F Føroya Sporførisskipan stovnað.
- **Føroya Sporførisskipan verður sett í verk kring landið í summar, 2009**.

## FØROYA SPORFØRISSKIPAN Í STUTTUM

Endamálið við Føroya Sporførisskipan er at menna eitt talgilt undirstøðukervi til sporførar skrásetingar, grundað á verandi skjøl. Felagið vil vera fremst innan talgilt ketusporføri á alheims marknaðinum. Skipanin byggir m.a. á kend skjøl í fiskivinnuni, so sum døgnlistar, avreiðingarskjøl, vektarseðlar, flutningsskjøl og útflutningsskjøl.

Allar upplýsingar verða savnaðar í einum stórum dátagrunni, sum brúkarar so kunnu troyta, alt eftir hvørja atgongd teir hava tørv á, og møguleikar fyri. Eitt nú kann ein brúkari geva útlendsku kundum sínum atgongd til partar av skipanini, soleiðis at viðkomandi lætt og einfalt kann fáa at vita smálutir um ta vøru, sum hann hevur keypt. Reyði tráðurin í skipanini er, at eitthvørt virki (skip v.m.) skal kunna skjalprógva eitt lið aftur og eitt lið fram í ketuni. Við at seta liðini saman og inn í eina talgilda skipan, fæst eitt fullkomið yvirlit yvir alla vinnuna. Føroya Sporførisskipan brúkar øll kend altjóða vinnulig aðalkrøv.

# Landgrunssjógvurin – uppvakstrarøki hjá toski

*Sjógvurin á landgrunninum er eyðkendur við at vera væl blandaður og nakað kaldari og feskari enn sjógvurin útiá. Hesin sjógvur er uppvakstrarøki hjá m.ø. toski, og tann gróður, sum sjógvurin ber, hevur stóra ávirkan á, hvussu nógvur toskur kemur undan á Landgrunninum. Gróðurin sveiggjar tó nógv frá ári til ár, og orsøkin er útskifting millum landgrunssjógvin og sjógvin útiá.*

Á Landgrunninum, innan fyri umleið 100 m dýpi, er sjóvarfallsrákið so hart, at tað blandar sjógvin úr vatnskorpu og niður á botn. Tað merkir, at sami hiti er við vatnskorpuna sum við botnin. Harumframt fær sjóvarfallið sjógvin at mala runt Landgrunnin (Mynd 1). Hetta merkir, at sjógvurin í stóran mun verður verandi inni á grunnum og partvís er avbyrgdur frá sjónum útiá. Vit kunnu tí ímynda okkum, at hesin væl blandaði sjógvur er eitt ovurstórt akvarium, sum er uppvakstrarøki hjá m.ø. toski og hýsu.

Hitin í sjónum broytist við árstíðini, og á Landgrunninum er sjógvurin umleið 6 °C í februar-mars og umleið 10 °C í august-septembur. Hetta skiftið verður stýrt av hitaflutningi millum hav og luft. Um summarið er luftin heitari enn sjógvurin, og luftin hitar sostatt sjógvin, meðan tað er øvugt um veturin. Sjógvurin útiá verður sjálvsagt eisini hitaður og køldur av luftini, men har er støðan øðrvísi enn á Landgrunninum. Sjóvarfallið útiá er ov veikt at blanda sjógvin niður á botn, og tí verður bert eitt vatnskorpulag hitað um summarið har. Av tí, at heitur sjógvur er lættari enn kaldur sjógvur, verður hetta lagið liggjandi við yvirflatuna og hitnar tí meiri og meiri út á summarið. Um veturin kólnar sjógvurin við vatnskorpuna og




*Mynd 1. Miðalrákið á 10 ymiskum mátistøðum á Landgrunninum. Hetta er tað rákið, sum er eftir, tá vit síggja burtur frá sjóvarfallinum. Sjóvarfallið flytur í stóran mun bert sjógvin aftur og fram, men tá vit hava sjóvarfall yvir hellandi botn, ger hetta eitt miðalrák, ið melur við klokkuni.*

verður tyngri enn sjógvurin niðri undir. Tí søkkur hesin sjógvurin, so hvørt sum hann kólnar, og sjógvurin uttanfyri Landgrunnin er tí væl blandaður um veturin. Um okkara leiðir verður sjógvurin útiá blandaður niður á o.u. 500 m hvønn vet-



*Karin Margretha H. Larsen*




*Mynd 3. Miðalhitin í luftini fyri mánaðirnar januar-apríl (blá brotin linja) og gróður vísital fyri Landgrunnin (grøn linja). Lutfallsliga kaldir vetrar geva lutfallsliga góðan gróður, men hetta er neyvan øll søgan. T.d. var gróðurin størstur í 2000 og 2001, hóast hesir vetrar ikki vóru líka kaldir sum veturin 1995.*




*Mynd 2. Satelittmynd, ið vísir vatnskorpuhitan tann 18. apríl 2003. Litstigin í niðara høgra horni vísir hitan. Myndin er fingin frá Peter Miller, Plymouth Marine Laboratory.*

ur. At sjógvurin uttanfyri Landgrunnin verður blandaður niður á so stór dýpi merkir samstundis, at hann ikki kólnar líka skjótt og nógv, sum tann grunni sjógvurin á Landgrunninum. Tí verður størri og størri hitamunur millum sjógvin á Landgrunninum og útiá; størsti munurin er um várið, tá luftin ikki kølir sjógvin meira. Eitt dømi er víst á mynd 2, har sjógvurin á Landgrunninum er umleið 2 °C kaldari enn sjógvurin uttanfyri.

Umframt hitaflutning millum hav og luft er eisini nakað av útskifting millum sjógvin á Landgrunninum og sjógvin útiá. Henda útskifting má ganga ígjøgnum hitabrúnna, ið gyrðir sjógvin á Landgrunninum, og hon skiftir nógv í styrki. Mátingar og model-útrokningar benda á, at tá hitabrúgvin er sterk (t.e. stórur hitamunur), tá er útskiftingin veik og øvugt. Sum áður nevnt, er tað í stóran mun hitin í luftini, ið stýrir hitanum í sjónum. Tí kunnu vit vænta, at serliga kaldir vetrar køla sjógvin á Landgrunninum serliga nógv, so at hitabrúgvin verður sterk várið eftir.

At hitabrúgvin er sterk um várið hevur serligan týdning fyri gróðurin á Landgrunninum og alt tað, ið livir av hesum gróðri. Ein sterk hitabrúgv merkir, at útskiftingin er veik, og hetta førir við sær, at plantuæti verður verandi á Landgrunninum, har nóg mikið er av ljósi og tøðevnum, so at plantuæti kann nørast í stórum (Mynd 3). Tá er ríkiligt til hjá djóraæti at eta, og hesi nørast tí eisini væl, so at fiskayngul hevur ríkiligt at eta og so framvegis. Tílík ár, við góðum gróðri, síggjast tíðiliga aftur í hægri liðum í føðiketuni. Hesi árini eru toskur og hýsa feit og væl fyri, og nógv kemur undan hjá sjófuglinum. Rakárini, tá hitabrúgvin er veik og útskiftingin stór, tá verður plantuæti skolað burtur av Landgrunninum og kemur tí ikki rættuliga fyri seg. Tílík ár eru livilíkindini vánalig á Landgrunninum.


*Karin Margretha H. Larsen*
havfrøðingur, PhD
Fiskirannsóknarstovan




# Páll Hansen skal leiða tvey ár afturat

Eitt felag snýr seg um samanhald. At draga somu línu fær eina ítøkiliga meining, tá talan er um eitt fakfelag. Standa limirnir ikki saman, fáa teir lítið og einki burturúr.

Tað var hesin andin, sum hekk yvir aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum fyrsta leygardag í mars. Teir umleið hálvthundrað limirnir, sum vóru møttir, kendu allir týdningin av at hava eitt sterkt felag, og sjálvt um teir ikki vóru samdir í øllum málum, so var samanhaldið frammarlaga í øllum tí, sum varð til viðgerðar.

## Formansval

Páll Hansen fekk tvey ár afturat sum formaður fyri Maskinmeistarafelagnum, sjálvt um avbjóðarin til formanssessin í ár ikki var hvør sum helst. Jógvan Nybo var nógv frammi og ein aktivur formaður, tey árini hann leiddi felagið, men tá atkvøðurnar hesaferð vóru taldar, fekk sitandi formaður væl fleiri enn avbjóðarin.

Og hvat var tað so, sum Páll Hansen vann uppá. Júst samanhaldið. Samanhaldið stendur fremst í øllum tí, sum hann vil arbeiða við, og hetta samanhald skal enntá víðkast næstu árini, sigur hann. Stendur tað til Páll, skulu motorpassarar við í felagið, og tað fyrireikandi arbeiði, sum er byrjað, heldur áfram, sigur hann.

Limirnir í Føroya Motorpassarafelag eru einir 50-60 í tali, og við teimum gott



*Føroyska Maskinmeistarafelagið er eitt sterkt felag, men stendur tað til afturvalda formannin, skulu uppaftur fleiri hava møguleika at sleppa undir veingirnar hjá felagnum. At fáast við maskinur, skal av røttum geva fólki somu kenslu, sum maðurin í lýsingini fyri Vinnuháskúlan, ið einki óttast fyri, tí hann er jú maskinmeistari.*

Mentamálaráð, leiðslan á Vinnuháskúlanum, ávísir reiðarar og onnur fingu eitt hjartans orð við á vegnum, men ikki ógvusligari enn so, at vónin um eina loysn á trupulleikunum altíð var at hóma.

Viðvíkjandi skerjingunum á Vinnuháskúlanum vístu fleiri av fundarluttakarunum á, at Maskinmeistarafelagið ikki hevði verið nóg nógv frammi í almenninginum í hesum máli. Tað viðgekk formaðurin eisini, men hann segði, at nevndin hevur, og fer framhaldandi at leggja press á landsins myndugleikar í hesum máli. Tað nýggjasta, sum er hent við Vinnuháskúlanum er, at ovasta hæddin á skúlabygninginum við Krákugjógv, skal brúkast til annað endamál enn undirvísing, og hesa avgerð vónar nevndin verður broytt.

# Maskinmeistarafelagið



*Frá vinstru: Jørgin Mørkøre, Petur Egholm, Jóan Petur Patursson og Regin Olsen.*

400 limunum í Maskinmeistarafelagnum, vildi ein samanlegging talt nærum 500 limir. Hevði tað so eisini eydnast at fingið allar føroyingar, sum sigla uttanlands og eru limir í feløgum har, sjálvt um teir búgva í Føroyum, upp í felagið, fer at tátta í 550 limum.

Viðvíkjandi spurninginum um samstarv, hevur verið gott fótalag við Skipara- og navigatørfelagið og Føroya Fiskimannafelag, og spurningurin um økt samstarv ella enntá samanlegging eigur at viðgerast í felagnum, heldur formaðurin.

## Vinnuháskúlin

Páll Hansen legði annars ikki fingrarnar ímillum í formansfrágreiðing sínari, har

Annað mál hjá Maskinmeistarafelagnum sum fekk drúgva viðgerð á aðalfundinum, var spurningurin um eina uppstiging av maskinmeistara-útbúgvingini til bachelor-støði. Tað tyktist sum at yngru limir felagsins høvdu eitt sindur størri



áhuga fyri hesum evninum, men allir limirnir og nevndin tyktust vera samdir um, at støðið á Vinnuháskúlanum ikki var hækkað seinastu árini, og at tað var bæði synd og spell, tí skúlar í grannlondunum ganga øvugtan veg, so tann gongdin má vendast. Hendir einki, so fara fólk við pappírum frá eitt nú donskum skúlum at standa nógv sterkari enn fólk við føroyskum pappírum, varð víst á.

## Umskipan av felagnum

Millum onnur álvarsmál, so sum eftirløn, ið ætlanin er skal hækka so líðandi upp í 15 prosent í 2018, FAS-skipanin, sum ikki er nóg góð fyri tey, sum forvinna undir 35.000 krónur um mánaðin, og umdømið hjá føroyskari sjóvinnu í sambandi við reiðarar, sum ikki gjalda fólkinum hýru, varð eisini spurningurin um framtíðina hjá felagnum umrøddur. Í tí sambandi vísti Páll Hansen á, at tað verður neyðugt at fáa greiðu á spurningum, so sum hvørji feløg, ið kunnu hugsast at vera góð at leggja saman við, hvussu leiðslubygnaðurin í felagnum skal skipast í framtíðini, og í tí sambandi um formaðurin skal veljast fyri fleiri enn tvey ár í senn.

-Nú eri eg eftirhondini komin eitt sindur upp í árini, so tað verður kanska ikki aktuelt hjá mær, men skulu vit arbeiða framímóti einum meiri professionellum felag, sum fyri tað fyrsta er nógv størri enn í dag, og harafturat hevur formann, sum er løntur fulla tíð, so er spurningurin, um ein yngri skikkaður umsøkjari hevði havt áhuga fyri slíkum starvi, um viðkomandi bert slapp at sita í tvey ár, sigur Páll Hansen, verandi formaður.

*Skrivað: Leif Láadal*





# Umhvørvisráðstevna



*Hesi sótu við pallborðið og hildu fyrilestur, f.v.: Danmark: Vibeke Burchard, verkætlanarleiðari, Novo Nordisk A/S, Norge: Gunn Kristoffersen, YS., Island: Kristian Aspelund, Marorka, Finland: Jukka Leskelä stjóri, Finsk Energiindustri, Føroyar: Hákun Djurhuus stjóri, SEV.*

Í sambandi við, at stór altjóða ráðstevna var í Keypmannahavn í desember í ár skipaði Nordisk Maskinmester Forening fyri ráðstevnuni “Klima i Norden 2009”. Stevnan varð hildin 24. februar á SAS hotellinum á Amager.

Á skránni vóru fyrst fyrilestrar um orku- og umhvørvispolitikk sum heild, umhvørvisspurningar innan skipaferðslu, danska vindmylluídnaðin og umhvørvistiltøk innan svenska ídnaðin.

Síðani vóru fyrilestrar um leiklutin hjá maskinmeistarum í teimum avbjóðingum, sum standast av umhvørvisbroytingunum. Hetta varð skipað soleiðis, at limafeløgini í NMF høvdu hvør sítt umboð til at viðgera eitt aktuelt evni.

Maskinmeistarafelagið hevði heitt á Hákun Djurhuus, stjóra í SEV, um at umboða okkum. Hann helt ein áhugaverdan fyrilestur um, hvussu støðan er í Føroyum á orku- og umhvørvisøkinum. Hann nevndi høvuðsmálini fyri orkuframleiðslu í Føroyum og eisini hvørjum verkætlanum arbeitt verður við, t. d. vindorku, alduorku, trimskipan til skip, passivar veiðihættir o. a.

Umleið 150 fólk vóru á hesari ráðstevnu og samanumtikið var talan um eitt áhugavert tiltak.

Nevnd felagsins metir at, tað er umráðandi, at Maskinmeistarafelagið er við til slík tiltøk.

Í hesum føri góvu vit eisini eitt gott íkast til ráðstevnuna og tað eru vit glaðir fyri, sigur Páll Hansen formaður í Maskinmeistarafelagnum.



*Frá vinstru Magnús Magnússon, stjóri í Félag vélstjóra og málmtæknimanna, Kristinn Aspelund, Marorka, Arnljot Muren, fyrrverandi stjóri í Det Norske Maskinistforbund, Gunn Kristoffersen, Yrkesorganisasjonenes Sentralforbund - YS.*



*Frá vinstru: Jørgin Mørkøre, nevndarlimur í MF, Regin Olsen, næstformaður í MF, Kári Sigurheim, álitismaður hjá SEV, Jóan Petur Patursson, nevndarlimur í MF, Páll Hansen, formaður í MF*

Navigatørurin í brennideplinum

# Dánial Jákup Jørgensen

**Hvørja navigatiónsútbúgving hevur tú?**
Eg tók skipsførara summarið 1994

**Verandi starv?**
Stýrimaður við vaktarskipi í norsku oljuvinnuni

**Nær fór tú fyrstu ferð til skips?**
Í 1969

**Longsti túrur á sjónum?**
Seks og ein hálvan mánaða

**Hvørjum skipum hevur tú verið við?**
Trolarum, línubátum, ferðaskipum, vaktarskipum og eitt sindur við veitingarskipum og farmaskipum.

**Hvat er størsta avbjóðingin hjá einum navigatøri í dag?**
Góður sjómansskapur. Vit hava fingið eina altjóða trygdarskipan (ISM) umborð á skipini, og tað hevur alt siga, at hon verður gjørd og brúkt við rætta hugburði: Sum ein vegleiðing í góðum sjómansskapi, so at trygdin verður sett



í hásætið, so vit kunnu halda okkum frí fyri skyld, og at hon ikki verður brúkt til at vaska seg frían fyri skyld!

**Frítíðarítriv?**
Snøgga eitt sindur um hús og tún. Gera smávegis snikkaraarbeiði sjálvur heldur enn keypa. Og teldan fær sína tíð.

**Bilur?** Toyota Corolla

**Telda?** Fijitsu Siemens og Acer

**Hjúnarfelagið?** Hervør

**Børn?**
Lovisa 31, Marjun 30, Kristina 24, Jóhanna 20, Jeffri 19

**Besta bók?**
Veien til Jerusalem, Jan Gillou og Fiskerne, Hans Kirk, tí at tær eru spennandi og livandi lýsingar av persónum og søguligum tíðarskeiði.

**Besti sangur?**
Um tú vilt gleði vinna hjá Mikkjali á Ryggi. Hetta er gott støðið at byggja á.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?**
Míni næstu. Blídni og sínámillum virðing.

**Hvat kann øsa teg?**
Órættvísi og tekniskir trupulleikar

# MIÐ & MAGN skipar fyri fotokapping

## 3.000 krónur verða latnar fyri ta bestu og mest áhugaverdu myndina. 3 køn fólk verða sett at meta um innkomnu myndirnar, og taka avgerð um, hvør skal hava virðislønina.

Tað verður sagt, at ein mynd kann siga meira enn 1000 orð. Tað er ein av orsøkunum til, at MIÐ & MAGN bjóðar til eina myndakapping.

Fyri at skapa áhuga verða 3.000,- kr. latnar fyri ta bestu og mest áhugaverdu myndina. Vit seta 3 køn fólk at meta um innkomnu myndirnar, og taka avgerð um hvør skal hava virðislønina.

Vit rokna við, at undirtøkan verður góð, og fyri ikki at drukna í myndum avmarka vit kappingina soleiðis, at hvør luttakari – í mesta lagi – kann senda 3 digitalar myndir til kappingina. Myndirnar skulu sendast til midogmagn@gmail.com

Myndirnar skulu vera sendar í seinasta lagi 1. oktober 2009.

Úrslitið verður kunngjørt í MIÐ & MAGN; blað nr. 4, sum verður sent limunum stutt fyri jól komandi.

Vit rokna við at fáa so mikið nógvar myndir, at ikki allar kunnu fáa pláss í blaðnum. Tí fara vit at seta innkomnu myndirnar á eina heimasíðu, sum verður kunngjørd í MIÐ & MAGN nr. 4.

Vit avmarka ikki myndirnar til ávíst evni, allir møguleikar standa opnir.

Myndirnar kunnu vera náttúrumyndir úr Føroyum eins og úr fjarskotnum londum; talan kann vera um myndir av livandi verum á landi ella í sjónum. Myndirnar kunnu sjálvandi eisini vera av arbeiðsplássum á sjógvi eins og á landi. So tað verður bert hugflogi hjá hvørjum einstøkum, sum setur markið.

Tey, sum senda myndir til kappingina lata MIÐ & MAGN rættindi at brúka myndirnar.

# Føroyskt Maritimt Forum stovnað

*Nógv fólk var komið saman, tá ið felagið Maritimt Forum varð stovnað á fundi á Hotel Føroyum 3. desember 2008.*

Felagið hevur til endamáls at vera kveikjari fyri føroyska sjóvinnu, bæði á sjógvi og á landi, soleiðis at henda vinna við tíðini, umframt at gerast eitt gott ískoyti til tann føroyska samfelagsbúskapin, eisini verður áhugaverd og attraktiv.

Øll, sum áhuga hava fyri endamáli felagsins, kunnu gerast limir, tað veri seg einstaklingar, feløg ella felagsskapir. Innliman fer fram við skrivliga at venda sær til Maritimt Forum við umbøn um limaskap, har navn, bústaður, telefonnummar, fartelefonnummar og teldupostadressa verður upplýst. Við innliman verður rindað limagjald fyri avvarðandi roknskaparár.

Til at stjórna felagnum verður vald ein nevnd við 3 limum, umframt 2 tiltakslimir. Nevndin verður vald fyri eitt ár í senn, tó soleiðis at tveir av limunum skulu sita í tvey ár fyri at tryggja framhaldni í nevndararbeiðinum. Afturval er loyvt. Nevndini er heimilað at seta skrivara ella annan løgfrøðiligan persón til at umsita og greiða dagligu viðurskifti felagsins. Nevndin velur sínamillum formann, kassameistara og skrivara, sum eisini er varaformaður.

Á stovnandi fundinum vóru hesi vald í nevndina: Óla Hans Hammer Olsen, Eyðstein Djurhuus, Sámal Siversen, Sjúrður Gudjónsson og Leivur Mohr.




*Gunnbjørn Joensen p/f Thor, og Leivur Mohr, Føroya Banki*



*Sjúrður Guðjónsson CMM, og Jens Meinhard Rasmusen, Supply Service*



*Frá stovnandi fundinum*

# Tann fyrsti litti verður eisi

*Tann tíðin er farin, tá Washington setti føtur í spenni, hvørja ferð tað snúði seg um batar fyri umhvørvið. Mín stjórn fer ikki at avnokta veruleikan, men at taka við læru av honum, sigur Barrack Obama, forseti*

Á heimasíðuni hjá Hvíta húsinum verður m.a. sagt um stevnumiðini hjá nýggja amerikanska forsetanum Barrack Obama:... *skunda undir burðardygga vinnu innan plug-in hybridar, stimbra menning av burðardyggari orkuendurnýtslu og seta hol á umskiftið til eitt nýtt talgilt ravmagnsnet. Hendan íløga fer at umskapa búskapin og skapa 5 mió. nýggj arbeiðspláss.*

Soleiðis segði Barrack Obama bara nakrar fáar dagar eftir, at hann hevði svorið eiðin uttan fyri Hvítu Húsini. Hendan sama dagin legði hann fram eina umfatandi ætlan, sum var ein staðfesting av, at hann framvegis stóð við tað, sum hann hevði sagt undan og undir valstríðnum. Beint tvørt- urímóti undanmanni sínum tók hann teir nógvu og døpru spádómarnar um dálking og veðurlagsbroytingar í álvara. Undir Bush-stjórnini var at kalla eingin amerikanskur veðurlagspolitikkur. Hjá eftirmanni hansara var og er tað eitt av høvuðsmálunum.

Sum nýsvorin forseti nam hann longu í setanarrøðuni við umhvørvis- og orkupolitikkin.

– Vit skulu gagnnýta sólina og vindin og jørðina til at fáa okkara bilar at koyra og til at reka okkara verksmiðjur. Vit fara at broyta okkara skúlar, næmingaheim og lærdu háskúlar, so tey eru búgvin til at møta krøvunum frá teirri nýggju tíðini, segði Obama í setanarrøðuni.



– *Vit skulu brúka sólina og vindin til at dríva okkara bilar og okkara ídnaðarmaskinur*

## Grønur forseti

Tað er tí einki at siga til, at summi velja at kalla hann tann fyrsta litta heldur enn tann fyrsta svarta forsetan í USA. Víst er hann svartur og sostatt littur, men hann er eisini grønur. Spurningurin er so, um hann er og verður tann fyrsti grøni forsetin í USA. Avgjørt, sigur Tom Buk-Swienty, professari á Syddansk Universitet, við MIÐ OG MAGN.

Professarin vísir á, at tað er alt, sum bendir á, at so er og verður. Obama raðfestir umhvørvið sera frammarlaga, og hann tosaði eisini nógv um umhvørvið í valstríðnum. Búskapurin hevur fremstu raðfesting, men Omaba vil fegin fremja nakað kollveltandi á so týðandi økjum sum umhvørvinum og heilsuverkinum, sigur

# ni tann fyrsti grøni

Tom Buk-Swienty.

– Vit mugu tí rokna við, at hann fer at leggja dent á at fáa eitt grønari Amerika. Kongressin tykist eisini vera meiri opin nú, hóast nakrir av republikanarunum fara at gera mótstøðu. Men við teimum høgu oljuprísunum taka sjálvt tey konservativu undir við at venda rákinum ímóti øðrum orkukeldum, sigur Tom Buk-Swienty við MIÐ OG MAGN.

## Gore fyrimynd

Undir valstríðnum í fjør segði Obama, at hansara mál er at skarva 80 prosent av amerikanska $CO_2$-útlátinum innan 2050, og at USA skal ganga undan á altjóða pallinum, tá tað galt um umhvørvi, veðurlag og orku.

At hann hevur varðveitt hesa hugsanina aftan á valsigurin sást á einari røðu, sum hann helt fyri stuttum. Tá segði hann, at fyri at eggja øðrum til at virka fyri reinari orku fer USA at tvífalda sína framleiðslu av alternativari orku tey næstu trý árini.

Tey, sum hava kannað umhvørvis- og orkupolitisku ætlaninar hjá Barrack Obama, siga, at eitt navn gongur aftur allastaðni, og tað er Al Gore. Tað er greitt, at Obama hevur tikið fleiri tættir av orkupolitikkinum hjá fyrrverandi varaforsetanum, sum síðani sína politisku tíð er vorðin talsmaður fyri veðurlagnum. At Obama valdi sær júst Steven Chu til orkumálaráðharra og Carol Browner til ráðgeva í umhvørvis- og orkumálum sigur heldur ikki so lítið. Teir hava báðir arbeitt fyri Al Gore fyrr.

*Politiskir eygleiðarar hava nevnt, at tað er ikki bara idealisma, umhvørvisdálking og kærleiki til grøna orku, sum liggur aftan fyri royndirnar hjá Obama at styrkja alternativar orkukeldur í USA.*
*Talan er eisini um eina miðvísa ætlan, sum hevur til endamáls at gera landið meiri sjálvstøðugt og minni bundið at ríku oljulondunum sum t.d. Saudi Arabia, Iran, Irak, Kuveit og Venesuela. Hetta hevur verið nevnt sum royndin at gera OPEC til NO-PEC.*

## Búskaparstøðan

Tann ógvusliga fíggjarkreppan, sum hevur rakt mest sum øll heimsins lond, byrjaði í USA, og higartil hava flestu serfrøðingar mett, at tað helst fór at taka fleiri ár at fáa vøkstur aftur í amerikanska búskapin. Somu metingar hava verið frammi um búskapin í øðrum stórum londum.

Men nú tikist tað, sum um pípan hevur fingið eitt annað ljóð. Týðandi búskaparlig hagtøl fyri teir fyrstu mánaðirnar í ár vísa eina nógv jaligari gongd í USA, enn roknað hevur verið við. Í hesum sambandi eigur at vera nevnt, at tað hevur fingið tann annars so varna amerikanska tjóðbankastjóran, Ben Bernanke, at gloppa dyrnar fyri einum ávísum bjartskygni.

- Eg haldi, at so hvørt sum grønir spírar stinga seg upp á ymsum marknaðum, og fólk fáa trúnna aftur, so fer tað at elva til árræði, sum fer at fáa okkara búskap at reisa seg aftur, segði Bernanke í samrøðu við CBS-sjónvarpið.

Tað eru kortini tey, sum halda, at amerikanski tjóðbankastjórin eigur at sissa seg eitt sindur. Jens Lunde, sum er lektari á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn, heldur, at framburðurin frá einum mánað til annan er ikki nóg mikið til at byggja eina framtíðarvón á.



## Bústaðarmarknaðurin

Tað hevur javnan verið frammi, at tað, sum skapti fíggjarkreppuna, var støðan á amerikanska bústaðarmarknaðinum. Eisini á hesum øki eru jalig tekin at síggja í teimum seinastu tølunum. Tey vísa, at vøksturin innan nýbygging var heili 22 prosent frá januar til februar, og tað er størsti vøkstur eftir einum mánað síðani 1990. Hetta er eisini tann fyrsti vøksturin á økinum síðani 1998, tá vøksturin var 1,6 prosent.

Handilsmálaráðið í Washington sigur, at í januar vórðu 477.000 byggiarbeiði sett í verk. Í februar var talið 583.000, og tað var væl oman fyri metingina hjá Bloomberg, sum var 455.000.

Skrivað: Árni Joensen

*Al Gore er stóra umhvørvisfyrimyndin hjá amerikanska forsetanum.*

# Kollvelting í bil- og vindm

*Ein altjóða og sera umfatandi verkætlan skal nú seta ferð á royndirnar at menna elbilarnar, so at teir kunnu loysa teir vanligu bansin- og dieselriknu bilarnar av um nøkur heilt fá ár.*

Politiskir eygleiðarar hava nevnt, at tað er ikki bara idealisma, umhvørvisdálking og kærleiki til grøna orku, sum liggur aftanfyri royndirnar hjá Obama at styrkja alternativar orkukeldur í USA. Talan er eisini um eina miðvísa ætlan, sum hevur til endamáls at gera landið meira sjálvstøðugt og minni bundið at ríku oljulondunum, sum t.d. Saudi Arabia, Iran, Irak, Kuveit og Venezuela.

Hetta hevur verið nevnt, sum royndin at gera OPEC til NO-PEC.

## Kollvelting í bil- og vindmylluídnaðinum

Ein altjóða og sera umfatandi verkætlan skal nú seta ferð á royndirnar at menna elbilarnar, so at teir kunnu loysa teir vanligu bansin- og dieselriknu bilarnar av um nøkur heilt fá ár. Danmark hevur fingið ein høvuðsleiklut í hesum arbeiðinum, og í USA lovar Barrack Obama, forseti, elbilunum stuðul.

Hóast tað eru mong ár, síðani hann gjørdist kendur fyri elperuna, er gamli Thomas Edison aftur komin á breddan. Nú leggur hann navn til eina stóra verkætlan, sum skal menna elbilarnar. Tað er ikki av tilvild, tí Thomas Edison royndi seg sjálvur við elbilum fyri 100 árum síðani, men mátti dvína fyri Henry Ford og hansara bensinbilum. Nú verður roynt aftuir – í hansara navni.

Málið við teirri stóru verkætlanini er fyrst og fremst at menna verandi tøkni, so elorkan frá vindmyllum kann goymast í battaríum til bilar. Tað gevur tvær flugur í einum bresti. Í fyrra lagi koyra bilarnir við reinari og varandi orku, og í øðrum lagi ber til at gagnnýta elorkuna frá vindmyllum betur enn í dag.

Danmark er sum kunnugt leiðandi innan vindmyllutøkni og hevur avlopsorku. Hana kundi landið selt ígjøgnum kaðalar um Norðsjógvin ella Eystrasalt. Men hesar loysnir eru sera dýrar, og tí eru danir meiri hugaðir at kanna, um avlopsorkan kann brúkast til elbilar. Danmark fær eisini ein týðandi leiklut í EDISON-verkætlanini. Danski parturin verður skipaður sum samstarv millum átta almennar stovnar, tryggingarfeløg, privatar, altjóða fyritøkur og orkuveitarar, og fleiri milliardir krónur skulu brúkast í sambandi við verkætlanina.

## Battaríið

Higartil hevur tað verið trupult at goymt elorku í battaríum, sum eitt nú kunnu brúkast í hópframleiddum elbilum. Ein annar trupulleiki í orkuframleiðsluni hevur verið, at vindmyllur framleiða ov nógva orku, tá eftirspurningurin er lítil. Tað ger seg serliga galdandi um náttina, og tá framleiða vindmyllurnar í eitt nú Danmark meiri el, enn tørvur er á.

Hesin knúturin er nú loystur, og í hesum sambandi er Danmark komið á heimskortið. Farið er undir eina milliardaverkætlan, sum tvinnar ovurframleiðsu frá vindmyllum saman við løðing av elorku til elbilar.

Fleiri royndir at menna elbilar eru miseydnaðar, og í flestu førum hevur júst battaríið verið trupulleikin. Tá menn í nítiárunum komu við litium-ion battarínum til fartelefonir og farteldur, fingu teir, sum fingast við elbilar, nýggja vón. Ymsar ábøtur vóru kortini neyðugar fyri at gera battaríini tryggari, og úrslitið er, at í dag hevur ídnaðurin eitt litium-ion battarí, sum lýkur øll krøv hjá elbilum.

Ein trey fyri, at hetta kann gerast veruleiki, er, at tað verður líka lætt at løða ein elbil, sum tað er at fylla bensin ella olju á vanligar bilar.

## DONG Energy

Danska fyritøkan DONG Energy er við í einari stórari verkætlan um elbilar, og gongst eft-



# nylluídnaðinum



*Anders Eldrup, stjóri í DONG Energy, við einum av teimum komandi elbilunum hjá DONG Energy og Project Better Plac (Mynd: DONG)*

ir ætlan, kunnu danskir bileigarar skifta teir bensin- og dieselriknu bilarnar út við vælvirkandi og snøggar el-bilar, sum millum annað skulu brúka elorku frá vindmyllum, longu um tvey ár. Tann stóra verkætlanin skal samstundis gera tað møguligt at goyma elorku frá vindmyllum og fer at skerja $CO_2$-útlátið.

## Samstarv

DONG Energy er ikki einsamalt um verkætlanina, men hevur fingið sær samstarv við amerikonsku fyritøkuna Project Better Place, sum hevur heimstað í Kalifornia. Amerikanska fyritøkan skal standa fyri útbreiðsluni, sum byggir á tann grundtanka, at brúkarin keypir sjálvan elbilin, men leigar battaríið.

Gongst sum DONG og Project Better Place ætla, verða tær fyrstu donsku løðiog skiftistøðirnar settar upp í hesum árinum, samstundis sum royndir verða gjørdar við royndarbilum frá Renault-Nissan.

Fyrireikararnir rokna við, at fólk eisini fara at løða bilin frá einari kontakt heima við hús ella á parkeringsplássum. Við fullum battarí kann bilurin koyra einar 150 kilometrar, og tað verður hildið at vera nóg mikið til ein dag hjá teimum flestu. Í Danmark er ætlanin eisini at seta skiftisstøðir upp til teirra, sum hava tørv á meiri enn einari løðing um dagin. Á hesum støðunum kunnu bileigararnir lata tað tóma battaríið inn og fáa eitt fult løtt í bilin ístaðin fyri.

Hugsanin aftan fyri elbilaætlanina hjá DONG ein einføld: Við at brúka elorku í flutningsvinnuni ber til at skerja nýtsluna av bensini og diesel, og elframleiðslan frá vindmyllum, ið ert $CO_2$-frí, kann gagnnýtast betur. At fleiri fara at brúka el-bilar ger, at tað fer at bera til at goyma elorku frá vindmyllum við at løða battaríini.

Hugsanin hjá fyrireikarunum er, at fólk eisini skulu kunna løða bilarnar um náttina, tí tá standa teir flestu bilarnir kortini stillir, og tað er eisini tá, at vindmyllur ofta framleiða meira el enn tørvur er á.



Ber tað til at fáa fólk at brúka el-bilar og at seta teir at løða um náttina, verður javnvágin millum framleiðslu og nýtslu nógv betur enn í dag.

## Eins og aðrir bilar

Elbilarnir, sum koma á teir donsku vegirnar, fara ikki at standa aftan fyri teir bensin- og dieselriknu bilarnar, sum nú koyra á vegunum. Teir verða líka kvikir, fara at koyra líka skjótt og verða líka snøggir innan eins væl og uttan. Harafturat fara elbilarnir at brúka minni orku fyri hvønn koyrdan kilometur enn dagsins bensin- og dieselbilar.

Tað vil siga, at sjálvt um tað verður so stilt í veðrinum, at vindmyllurnar ikki megna at nøkta tørvin, og at elbilarnir mugu løðast við orku frá orkuverkunum, verður CO2-útlátið fyri hvønn koyrdan kilometur framvegis munandi minni enn frá bensin- og dieselbilum.

Ætlanin hjá teimum báðum fyritøkunum er, at alt kervið skal standa liðugt til at taka í nýtslu í 2011, og tá er stutt sagt einki mark fyri, hvussu nógvir ella hvørjir bilar fara at koyra við vindorku sum drívmegi.

Skrivað: Árni Joensen

# Obama skumpar undir elbilarnar

## Elbilarnir eru ein týðandi táttur í orkupolitikkinum hjá nýggja amerikanska forsetanum, sum játtar milliardir til at bøta um tøknina í elbilunum


*Obama leggur dent á at samstarva við fólk við drúgvum royndum, m.a. Edward Kennedy.*

Guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, hevur leingi verið talsmaður fyri einum meiri umhvørvisvinarligum orkupolitikki, og tað var tí ikki so løgið, at Barrack Obama, forseti, hevði nøkur jalig lyfti við sær, tá hann fyri stuttum var í Kalifornia á vitjan.

Í einari røðu segði Obama, at hann hevði gjørt av at játta 2,4 milliardir dollarar til at bøta um tøknina í amerikonskum elbilum, tí USA skal ganga undan innan grøna orku, segði hann. Pengarnir eru úr tí risastóra hjálparpakkanum, sum Kongressin samtykti herfyri.

### Vitjan í Kalifornia

Undir vitjanini í Kalifornia høvdu fyrireikararnir skipað so fyri, at forsetin skuldi vitja eina støð, har elbilar verða royndir.

\- Vísið okkum, at tykkara hugskot og tykkara avrik eru tey best skikkaðu til at átaka sær avbjóðingarnar, sum Amerika setir tykkum. Klára tit tað, skulu vit geva tykkum møguleikan at prógva tað, segði Obama, tá hann vitjaði royndarstøðína.

### Betri battaríir og vegakervi

Stuðulin, sum stjórnin í Washington ætlar at brúka til at menna elbilarnar, skal í fyrstu atløgu brúkast til at gera betri battaríir og harvið loysa tann største trupulleikan, sum elbilarnir hava at stríðast við. Herumframt skulu 400 milliónir dollarar brúkast til at bøta um møguleikarnar hjá elbilum í amerikanska vegakervinum.

Oman á stuðulin til at menna elbilarnar hevur Obama-stjórnin boðað frá, at tann, sum keypir sær ein elbil, sleppur at draga 7.500 dollarar frá í skattinum.

Skrivað: Árni Joensen



# 500 vindmyllur fyri 20 milliardir

*DONG Energy og Siemens hava skrivað undir eina avtalu um, sum er tann størsta í heiminum nakrantíð av sínum slagi. Eftir avtaluni skal Siemens gera upp til 500 havvindmyllur fyri DONG Energy. Tær skulu setast upp í havvindmyllu-lundum ymsastaðni í Norðurevropa tey næstu árini*

Framleiðsluorkan hjá teimum nýggju vindmyllunum verður upp til 1800 megawatt. Tað er avgjørt, at tær skulu setast upp ymsastaðni í Norðurevropa, og góðkenningar og fíggjarligar umstøður verða avgerandi fyri, hvar vindmyllurnar skulu standa, og í hvørjari røð tey ymsu støðini verða útbygd, sigur DONG.

DONG og Siemens hava arbeitt saman í mong ár við at gera og reka havvindmyllur. DONG Energy hevur bygt umleið helmingin av øllum vindmyllulundunum, sum eru í vinnu kring heimin, og felagið sigur, at tann nýggja avtalan við Siemens fer at styrkja støðuna hjá DONG sum tann leiðandi fyritøkan á økinum. Samstundis skal avtalan leggja lunnar undir undir framtíðarætlaninar hjá fyritøkuni innan varandi orku.

Leiðslan í Siemens er eisini sera fegin um ta nýggju avtaluna við DONG Energy. Felagið sigur, at avtalan gevur Siemens møguleikar fyri at halda fram við at menna vindmylluframleiðsluna og styrkir støðu felagsins sum leiðandi framleiðari av havvindmyllum. Leiðslan í Siemens sigur, at við avtaluni hava Siemens og DONG Energy tikið eitt risafet á havvindmyllu-marknaðinum, sum er tann tøknin, ið veksur eina skjótast av allari tøkni innan varandi orku.

Vindmyllurnar, sum Siemens skal lata sambært teirri nýggju avtaluni, verða 3,6 megawatt hvør og hava sostatt somu framleiðsluorku sum vindmyllurnar, sum DONG er í ferð við at seta upp á Gunfleet Sands í Onglandi.

Skrivað: Árni Joensen



*Avtalan við Siemsen fer at styrkja støðuna hjá DONG sum tann leiðandi fyritøkan á økinum. Myndin niðanfyri er av fundamentum, ið vindmyllurnar skulu setast á.*



# Páll Hansen formaður í Maskinme

Maskinmeistarafelagið hevði aðalfund 7. mars 2009. Tá var Páll Hansen afturvaldur til formann í felagnum. Hjá honum kann sigast, at hann er annað ættarlið av maskinmeistarum í ættini. Hann er nærum føddur til at vera maskinmeistari.



Pápi Páll var Poul Hansen, f. 1906. Hann arbeiddi á gamla elektrisitets-verkinum í Havn, og var tí vanliga nevndur Poul á Verkinum. Hetta merkir, at teir báðir feðgarnir hava verið partur av okkara elframleiðslu stórt sæð alla ta tíð, vit hava havt ravmagn.

Poul var sonur Jens Hansen hjá Gustu, sum er ein kend familja í Havn. Mamma Poul var Katrina f. Niclassen úr Sørvági.

Tað var í 1921, at ravmagn kom í Havn. Býráðið bygdi eitt verk á Rundingi úti við Skipasmiðjuna. Hetta var samstundis sum vatnverkið í Botni í Suðuroy varð bygt. Hetta var javnstreymur, og hann var dýrur. Tað vóru als ikki øll, sum høvdu ráð at fáa sær ravmagn ta fyrstu tíðina.

## Pápin gjørdist stjóri á verkinum

Poul kom at arbeiða sum ørindadrongur á elverkinum frá byrjan av. Tá var hann 15 ára gamal. Hann hevði ongan formligan lærdóm, men hann fekk sína læru úr lívsins skúla, og seinast í 30-unum gjørdist hann stjóri á elverkinum. Hann tók við eftir danan Christian Bach, sum júst náddi heimaftur til Danmarkar, áðrenn sambandið millum londini varð kvett orsakað av krígnum.

Hann var annars ein sjáldsamur maður, sum royndi ymiskt. Hann royndi millum annað at garva hvalahvølju. Men tað eydnaðist ikki at beina fyri lýsiluktinum, tí kom ikki meira burturúr.

## Pápin býráðslimur

Poul var giftur við Turid f. Niclassen úr Klaksvík. Tey fingu trý børn. Umframt Páll er tað Elsa, gift við Páll Horn, gamla skipara. Elsa er fyrsta sjúkrasystir í Føroyum, sum hevur fingið útbúgving sum røntgensjúkrasysttir, og hevur hon arbeitt sum slík í mong ár.

Beiggin Asbjørn býr niðri. Hann fór niður 16 ára gamal at fara í læru í fyritøkuni Thomas B. Thigan, kend fyri elmotorar. Fór síðan at lesa til verkfrøðing.

*Á Sundi verður framleitt helvtin av øllum streymi í landinum, og er tí eisini størsti einstaki elframleiðari. Tí er Sund eisini sera sárbart. Tað kemur fyri, at streymurin fer, og tá ilskast fólk sum rímiligt er. Tað verður tikið til, at hetta hendir ikki í Danmark. Men her er munurin tann, at Danmark hevur kaðlar til fleiri grannalond, sum kunnu taka við í stundini, um tað er neyðugt.*

Sum verkfrøðingur hevur Asbjørn havt uppgávur fyri SEV. Hann gjørdist seinni tekniskur leiðari hjá De Forenede Bryggerier, sum er samanrenningin millum Carlsberg og Tuborg.

Í 1950 flutti elektritsverkið niðan í Gundadal, har tað kom at vera ein miðdepul fyri harðliga arbeiðsmannaverkfallið í Havn í 1951. Men tað er ein onnur søga.

Poul var eisini býráðslimur fyri tjóðveldisflokkin í Havn og var millum annað formaður í havnanevndini. Hann hevði júst byrjað triðja skeiðið, tá ið hann doyði í 1971. Hann náddi júst sín 50 ára starvsdag sum starvsmaður innan elframleiðslu.

Fyri Poul kom Ólavur Michelsen inn í býráðið. Hann doyði eisini ungur.

## Páll fór í Nonnuskúlan

Páll er føddur í 1947; hann gekk í barnaskúla hjá nonnunum. Her vóru tað fyrstu árini bert nunnur ið undirvístu. Í 3. flokki kom ein føroyskur lærari, ein kvinna úr Suðuroy, og í 5. og 6. flokki fekk Páll hjúnini Katrin og Ólav Michelsen sum lærarar.

Ólavur skrivaði longu tá fyri blaðið 14. September, gamla málgagnið hjá tjóðveldisflokkinum.

Páll búði úti í Hornabø, har Erlendur Patursson, blaðstjórin, búði, og har 14.



September helt til. So Páll plagdi at taka greinir hjá Ólavi við heim uppá at lata tær inn hjá Erlendi.

## Lærdi til elektrikara

Tá ið Páll fylti 14 ár gavst hann eisini beinanvegin í skúlanum. Tórshavnar Kommuna hevði eina smiðju, og har fór Páll at vera ørindadrongur. Hann hevði áhuga fyri teknikki, so hetta passaði honum væl, meðan hann bíðaði eftir at sleppa í læru. Til hetta kravdist, at man var 15 ár.

Táið Páll hevði rokkið nevnda aldursmark, fór hann í 1963 í læru sum elektrikari hjá Einar Mikkelsen í Bøgøtu. Páll heldur seg vera heldigan at fáa hetta lærupláss. Tað var júst hesa tíðina, at tá ið nýggja Landssjúkrahúsið varð bygt, og her kom Páll at arbeiða alla sína lærutíð. Hetta var ikki hissini uppgáva, men tað var sera læruríkt at kunna leggja elektrisitet í størsta bygning í landinum.

## Til Danmarkar og so til skips

Men Páll vildi framvegis royna nakað nýtt, so hann arbeiddi bert ein dag sum sveinur. Hann fór fyrst á Tekniskt Fyrireikingarskeið í Danmark. Síðan fór hann til skips. Hann fór við St. Jaques úr Vági á sild við gørnum. Skipari var Páll Horn, svágur hansara.

Hetta var annars seinasta ár, at sild fekst við gørnum á gomlu sildaleiðunum millum Føroyar og Ísland. Hetta summarið í 1968 var annars slett ikki so galið til sild. Mest fekst enntá seinast í sesongini, sum gekk út í oktober.

Men árið eftir fekst ikki livandi, og skipini fóru ikki aftur á hesa veiðu. Skipini fingu tá nøkur ár møguleika at keypa sild í Skotlandi og at salta hana umborð. Summi fluttu sildina feska á danska marknaðin.

## Leivur Hepni

Seinast í 1960-unum fær Páll eina nýggja avbjóðing. Tá er tað, at Tórshavnar Trolarafelag, sum frammanundan átti trolaran Magnus Heinason, byggir ein nútímans stóran yvirdekkaðan línubát, sum fekk navnið Leivur Hepni. Skipari var Páll Horn, og Páll var so heppin at sleppa við. Tá vóru føroyingar aftur byrjaðir at veiða við gørnum, so Leivur Hepni fór til Grønlands við hesum reiðskapi. Tað hevði gingið hampiliga við gørnum árini frammanundan.

Hetta gekk hampuliga at byrjað við. Teir fingu 100 tons í saltfiski fyrsta mánaðin. Men síðan fingu teir ikki inn í eygað.

Um hesa tíðina vóru føroyingar eisini farnir at veiða við gørnum undir Føroyum. Hetta gekk stak væl. Skipini fingu fyrst nógvan upsa og síðan nógvan tosk. Hetta frætta teir umborð á Leiv Hepna sjálvandi, og teir gera ikki vandari enn at fara at sigla heim beinleiðis á Norðhavið.

## Útróðrarmenn kendu seg hóttar

Men tá hevði hesin garnafiskaskapur longu skapað órógv millum útróðrarmenn, sum sóu hesa garnaveiðina sum eina hóttan bæði móti sær sjálvum og eisini móti toskastovninum.

Og so kemur hetta stóra "djórið" afturat inn á grunnin. Málið gjørdist politiskt, og løgtingið tók stig til at skerja garnaveiðuna. Hetta skapti so aftur øði í garnamenn. Skipini fóru inn á Havnina, og manningarnar fóru niðan í tingið at gera vart við sína ónøgd. Tað sluppu ikki allir menninir inn, so restin stóð uttanfyri tingið.

Tá gjørdist tað tiltikna eggjakríggið. Onkur manning hevði tikið ein eggjakassa við sær í land, og teir fóru at blaka egg eftir tingmonnum, so hvørt teir komu út úr tinghúsinum.

Páll kom tískil hendan túrin við Leiv Hepna at vera burtur í heilar sjey mánaðir, og samlaða veiðan gjørdist bert 200 tons, íroknað tað sum fekst á Norðhavinum. Hetta var bert ein brotspartur av tí, sum skipið tók. Her var eingin møguleiki fyri lønandi rakstri.

## Leivur Hepni gjørdist Skálafossur

Leivur Hepni gjørdist seinni til kraftblokkaskipið Skálafossur inni á Skála. Teir gjørdu tað gott. Síðan gjørdist hann til Havlot í Fuglafirði. Tað gekk illa. Nú er hann Ruth hjá Gullak Madsen í Hirtshals. Tað hevur gingið stak væl.

Páll fór so við Grasinum, fyrrverandi Tummas við Kráir, á saltfiskaveiðu við Canada, aftur við Páll Horn sum skipara. Teir munnu hava verið eitt tað seinasta føroyska skipið, sum veiddi inni í St. Lawrenceflógvanum í Canada. Har fiskaðu føroysku trolararnir eisini. Inni í flógvanum var nógvur fiskur at fáa, men hann var bara so smáur, at teir rýmdu haðani.

Teir fóru so til Labrador og síðan á Flemish Cap, og har var nærum altíð fiskur at fáa.

Heimkomnir fóru teir til Ullapool í



Skotlandi at keypa sild, sum varð saltað uppí tunnur.

## Í Maskinskúla

Nú legst Páll aftur uppá land. Hann fer á Tórshavnar Skipasmiðju at arbeiða. Fyri at sleppa á maskinskúla var neyðugt við 9 mánaðar smiðjutíð. Eisini var neyðugt við eitt árs siglingstíð við tænastu í maskinrúmi, men hetta hevði hann longu fingið.

So fór Páll á maskinskúlan, har Magnus Simonsen var stjóri. Her var Páll liðugur í 1973.

## Eftir Cubatrolarunum

Tá fekk Páll aftur eina spennandi uppgávu. Hetta var at fara til Cuba eftir Cubatrolarunum, sum Skipafelagið hevði keypt. Teir vóru eina viku á Cuba at rigga skipini til. Tað var tó ikki nógv, teir sóu. Nógv var at gera, og tað slapst heldur ikki uttan víðari í land. Men teir vóru so eina útferð. Her sóu teir í hvussu er, hvussu propagandain virkaði. Hon samsvaraði vist ikki rættuliga við verunleikin! Ferðin heim tók 18 samdøgur.

Tað hendi einki meira við Cubatrolarunum í fyrsta umfari, so nú var hjá Páll at finna sær nakað annað.

## Á ferð kring knøttin

Her var Páll aftur heppin. Hann slapp við Dorit Skou hjá reiðarínum Ove Skou. Hetta var ein nýbygningur frá Helsingør Skibsværft, so Páll slapp at royna skipið frá byrjan av. Hann var eisini við royndartúrin við gestum, tá teir aftaná komu at liggja við Langelinje.

Teir fóru fyrst upp til Kock í Finlandi at lasta pappír til Australia. Hetta var ein ordans teinur. Teir sigldu 17 míl og nýttu kortini 36 samdøgur um ferðina. Einaferð vóru teir inni á leiðini, og tað var í Las Palmas at bunkra.

Teir komu til Sidney beint eftir, at tað tiltikna Operahúsið var tikið í brúk. Arkitekturin var danin Jørgen Utzon. Tað var so nógv rok um húsið, at Utzon vísti seg ikki aftur í Sydney. Hann er annars júst deyður, heiðraður av øllum.

Í Australia lastaðu teir rásukur, sum sær út sum putursukur. Hetta gekk skjótt fyri seg. Talan var um nútímans útgerð, og teir fyltu skipið við 12.000 tonsum eftir fýra tímum. Teir førdu sukrið til Japan, har tað var upplossað í tveimum havnum, Osaka og eini havn nærindis.

## Fidjioyggjarnar

Skipið fór so tømt til Fidjioyggjarnar í Kyrrahavinum, har teir skuldu lossa sukur til Onglands. Her var munur á. Nú tók tað ein heilan mánaða at fylla skipið. Sukrið varð í sekkjum siglt umborð í prámum. Sekkirnir vóru so handaðir uppá dekkið, opnaðir og stoyttir niður í lastina. Tað vóru 125 mans, sum búðu umborð alla hesa tíðina.

Í Fidji bar væl til at sleppa í land við prámunum. Her lá eisini væl fyri at síggja seg um, og her var sera vakurt.

So var farið heim til London gjøgnum Panamaveitina. Við munnan til Themsen máttu teir landa 3.000 t. fyri at lætta um skipið, so tað kundi koma niðan til Tower at landa restina av lastini til eina gamla sukurfabrikk.

Síðan fóru teir til Hamburg. Tá hevði Páll verið verið kring allan knøttin, og hendan ferðin hevði tikið eitt hálvt ár við spennandi upplivingum.

## Hjá SEV

Nú fór Páll í land, tí hann ætlaði sær víðari uppá skúla beinanvegin. Hann hevði verið juniormeistari, men skuldi hann koma hægri upp, var neyðugt við fulla maskinútbúgving.

Henda ætlan varð tó seinkað. Hann kom tá tilvildarliga í starv hjá SEV, sum var byrjað at byggja verkið á Sundi. So hann kom at ganga vakt har, inntil hann fór á skúla. Nú er stórur trafikkur fram við Sundsverkið. Men soleiðis hevur tað ikki altíð verið. Tá í tíðini mátti gangast av Sundshálsi, hetta tók einar 20 minuttir. Heim aftur var niðanbrekka og var tað eitt sindur strævið.

Páll fekk so farloyvi frá SEV til at fara aftur á maskinskúla, og tað var hann í 1976/1977 í Danmark, og síðan tá hevur Páll starvast hjá SEV á Sundsverkinum.

## Verkið á Sundi

Her arbeiða 25 mans í alt. Tveir eru altíð á vakt, og teir ganga trýskiftisvakt. Tað eru fleiri, sum arbeiða fast um dagin. Tá kunnu teir vera 10-12 mans til arbeiðis. Vansin við at ganga vakt eru tær skiftandi arbeiðstíðirnar, sum kunnu vera vandafullar fyri heilsuna. At mótvirka hesum roynir Páll at ganga nógv. Her hjálpir tað nógv, at hann hevur hund, og teir báðir ganga upp til fleiri tímar hvønn dag, sum gangandi er.

## Helvtin av føroyskum streymi

Á Sundi verður framleitt helvtin av øllum streymi í landinum, og er tí eisini størsti einstaki elframleiðari. Tí er Sund eisini sera sárbart. Tað kemur fyri, at streymurin fer, og tá ilskast fólk sum rímiligt er. Tað verður tikið til, at hetta hendir ikki í Danmark. Men her er munurin tann, at Dan-

# Navnið „MIÐ & MAGN“



Tá Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag samtyktu at fara undir felags blaðútgávu, skipaðu feløgini fyri kapping, sum hevði til endamáls at finna blaðnum eitt navn, ið kann sigast at umboða samleikan hjá báðum feløgunum.

Tá freistin var úti høvdu feløgini fingið tilsamans 18 uppskot.

Fleiri av uppskotunum vóru góð, og tí vilja feløgini takka øllum, sum tóku lut í kappingini.

Feløgini vóru samd um, at lata Sjúrði Heinesen virðislønina uppá 15.000 krónur, og blaðið fær tí navnið: MIÐ & MAGN.

Sjúrður Heinesen sigur í stuttari viðmerking til uppskotið, at tað er grundað á, at talan er um tvey ymisk yrki. Eg havi roynt at finna eitt heiti fyri hvørt yrki og sett tey saman. Tað finnast sjálvandi nógv onnur heiti, men eg havi roynt at finna orð, sum eru løtt at siga.

Mynd frá vinstru Eyðstein Djurhuus, Sjúrður Heinesen og Páll Hansen

mark hevur kaðlar til fleiri grannalond, sum kunnu taka við í stundini, um tað er neyðugt.

Annars hevur verið nógv menning á Sundi. Teir gomlu motorarnir eru skiftir út. Nú eru um 64.000 hestakreftir á Sundi, og teir brenna vanliga einar 100 tons av olju um samdøgrið. Er turkur ella onnur orsøk til, at vatntrot er, so má koyrast meira á motorarnar. Annars koyra teir soleiðis, at tað er mest økonomiskt.

Sigast kann, at Páll umframt holla útbúgving eisini hevur sera breiðar royndir innan maskinøkið.

## Gjørdist fakfelagsmaður

Tey fyrstu árini fingu maskinmeistararnir handverkaraløn, men teir fingu so egnan sáttmála í 1978. Tað var eisini um hesa tíðina, at Páll gjørdist aktivur fakfelagsmaður. Tá gjørdist hann álitismaður hjá sínum starvsfeløgum.

Páll kom í nevndina í maskinmeistarafelagnum í 1983 og sat í fyrsta umfari til 1993. Tá fór Páll burtur úr nevndini av persónligum orsøkum. Í 2001 kom hann aftur í nevndina, og í 2007 gjørdist hann formaður. Hetta hevur verið eitt áhugavert arbeiði, men eisini strævið. Í fakfelagsarbeiði er tað sum við so nógvum øðrum. Avbjóðingarnar verða fleiri og fleiri. Tí verður meira og meira at gera, og virkisøkið hjá Maskinmeistarafelaganum, eins og hjá øðrum feløgum, verður størri og størri.

Skrivað: Óli Jacobsen

# Tíðindi frá Skipara- og Navigatør

## Skrivstovan og dagliga arbeiðið

Skrivstovan hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag er opin allar yrkadagar frá kl. 9-15.

Formaðurin og skrivarin starvast fast hjá felagnum, og næstformaðurin er til arbeiðis eftir tørvi.

Limir og onnur venda sær regluliga til felagið við ymiskum málum og fyrispurningum.

Felagið leggur stóran dent á at veita eina munadygga tænastu til teirra, sum venda sær til felagið.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag leggur eisini stóra orku í at gera viðmerkingar til øll lógaruppskot og kunngerðir, sum viðvíkja viðurskiftunum hjá limum okkara. Hetta er okkara demokratiski rættur til veruliga ávirkan, í einum vælvirkandi samfelag.

Felagið er umboðað í fleiri alment settum nevndum og ráðum. Til at røkja hesar uppgávur, má felagið nýta nógva arbeiðsorku. Nevnast skal, at ongin samsýning verður latin fyri hetta arbeiðið.

Fyri at veita limunum so góða tænastu sum gjørligt er neyðugt at fylgja væl við, tá talan er um t.d. tvingsilssølur og útistandandi hýru. Hetta kann vera tíðarkrevjandi arbeiðið, sum verður veitt limunum ókeypis. Her kunnu vit eisini nevna, at tað kemur javnan fyri, at felagið leggur út fyri hýru, og tryggjar sær pening við sjópanti fyri okkara limir.

Á heimasíðu felagsins – www.fsn.fo - liggja allir sáttmálar og lønartalvur. Aktuell tíðindi verða javnan løgd á heimasíðuna; lat okkum eisini her nevna heimasíðan hevur nógvar vitjanir hvønn dag.

## Oljukreppa

Prísurin á olju hækkaði óvanliga nógv miðskeiðis í 2008. Trupult var at fáa lønandi rakstur hjá fleiri skipabólkum. Reiðarafelagið ynskti tí at fáa samráðingar við manningarfeløgini við grundarlagi í oljuprotokolatinum. Ført varð fram, at um manningarfeløgini ikki vildu samráðast, so metti Reiðarafelagið seg at vera frítt stillað til at samráðast beinleiðis við einstøku manningarnar.

Hesa støðu ynsktu vit ikki at koma í. Eftir tveir samráðingarfundir góvu manningarfeløgini eitt tilboð til Reiðarafelagið fyri skipabólkin Lemmatolarar.

Feløgini góvu tilsøgn um, at býtisprosentið, tað sum eftir var av sáttmálaskeiðnum varð sett til 26%. Harumframt góvu feløgini tilsøgn um, at gera líknandi avtalu fyri aðrar skipabólkar. Kravt var eisini av Reiðarafelagnum, at teir skuldu nokta limum sínum, at taka upp samráðingar beinleiðis við einstøku manningarnar um tær høgu oljuútreiðslurnar. Tá nakað var fráliðið skiltist, at Reiðarafelagið ikki var huga fyri hesum, og tí spurdist onki burturúr.

Okkum vitandi verða allir sáttmálar fylgdir. Tí betur er oljuprísurin nú lækkaður munandi, men protokolatið er enn í sáttmálanum. Felagið vil her nýta høvi til at takka Fiskmannafelganum og Maskinmeistarafelagnum fyri gott samanhald. Í hesum føri var veruligur vandi fyri, at allur sáttmálabygnaðurin fór fyri bakka undir oljukreppuni.



*Áshild Joensen skrivstovukvinna*

***Á heimasíðu felagsins – www.fsn.fo - liggja allir sáttmálar og lønartalvur. Aktuell tíðindi verða javnan løgd á heimasíðuna; lat okkum eisini her nevna, at heimasíðan hevur nógvar vitjanir hvønn dag.***

## Fiskidagar

Á Ólavsøku 2008 legði Landsstýrið uppskot fram um fiskidagar fyri komandi fiskiár. Uppskotið var rættuliga víðgongt, og var ein avskrift at tilmælinum frá Fiskirannsóknarstovuni. Lagt varð upp til munandi niðurskurð í fiskidagatalinum og víðfevndar økisfriðingar. Øll vinnan varð skelkað av uppskotinum, og tá bæði løgmaður og fiskimálaráðharrin nevndu hetta størsta frambrot fyri føroyska vinnu síðan avtøkuna av Einahandlinum vóru vit mong, sum øtaðust. Um uppskotið varð sett í verk, so hevði allur heimaflotin komið í stórar trupulleikar. Hetta var ein álvarsom hóttan omaná torføru støðuna - sum vinnan var í - orsakað av minkandi fiskiskapi, høgum oljuprísi og hækkandi rentu.

Endaliga úrslitið gjørdist ein niðurskurður á 15%, og óbroyttar friðingar. Felagið hevur ongan áhuga í, at fiskidagatalið/skipatalið er so høgt, at ongin fær lønandi rakstur. Men vit sakna ein skipaðan politikk, sum hevur til endamáls at minka skipatalið, samsvarandi fiskidagatalinum. Tá fiskidagatalið verður lækkað, fáa øll skip trupulleikar, og skipini mugu so sjálv royna at keypa frá hvørjum øðrum. Hetta kann vera torført, tá allir hava ov fáar dagar frammanundan. Fiskivinnupolitikkurin má skipast soleiðis, at til ber at fáa tey elstu og mest ótíðarhóskandi skipini burturúr flotanum, og soleiðis geva meira rúmd fyri teimum, sum eru eftir.

## Aðrar avtalur

Smærru trolbátarnir avrokna framvegis manningarnar uppá fleiri ymiskar mátar. Felagið hevur ikki sáttmála við Felagið Trolbátar, og hetta felagið er ikki partur av Reiðarafelagnum. Tó brúkar Lønjavningarstovan sáttmálan við Reiðarafelagið, sum grundarlag fyri útrokning av inntøkutrygd. Soleiðis missa hesir menn inntøkutrygd, og vandi kann verða fyri at missa rættin til sjúkrapening frá Lønjavning-




*Frá vinstru: Eyðstein Djurhuus, Leivur Christiansen, Regin Nónstein, Dan Ingi Andreasen, Jóhannes Jacobsen, Ellintur Abrahamsen, og Harry á Lakjuni.*

arstovuni, tá ein ikki er løntur sambært galdandi sáttmála.

Skattavaldið kann eisini álíkna eyka skatt, um teir gerast varir við, at fiskimenn ikki verða avroknaðir sambært sáttmála. Hesi skip eru undir mynstringarskyldu, teigurin á mynstingarskjalinum um hvør sáttmáli/avtala skal brúkast, eigur at verða fyltur út. Um ivamál tekur seg upp, hvat er galdandi, so hevur reiðarin próvbyrðuna. Her eigur at vera nevnt, at felagið førir eitt rættarmál vegna ein lim, sum krevur, at avroknast skal eftir sáttmálanum.

Vit meta ikki at rætturin er rætta staðið til at fáa hendan skipabólk undir skipaði viðurskifti. Allir partar mugu síggja, at óskilið, við so nógvum ymiskum avrokningarhættum, má halda uppat.

## Eftirlønarviðurskifti í fiskiskipaflotanum

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur nú ásannað, at skipanin við einum inngjaldi fyri hvønn mynstraðan dag, helst ikki er tann rætta. Øll onnur á arbeiðsmarknaðinum gjalda inn eftirløn í mun til inntøkuna, hetta er galdandi bæði fyri høgt og lágt lønt.

Núverandi skipan hevur ein innbygdan skeivleika. Hetta hevur samband við, at teir sum forvinna frægast, eru sum oftast teir, sum hava eina skiftisskipan og harvið fægst dagar í sjónum. Tað sama er galdandi fyri tey skip, har inntøkan ikki er so góð; har mugu menninir hanga í, og vera nógvar dagar burturi. Á henda hátt spara teir minst upp, sum hava bestu ráðini. Hetta er galdandi bæði fyri partin hjá reiðaranum og hjá manninum sjálvum.

## FAS skipan

Tað er altavgerandi fyri farmaskipaflotan, at kappingarførið er líka gott sum hjá grannalondunum. Broytingarnar, sum komu í gildi 1. januar 2009, skuldu gjørt okkara skipan kappingarføra. Sjómenn undir FAS koma at gjalda 35% í skatti og reiðaríini fáa 35% í afturbering.

Okkara uppgáva verður so at tryggja, at lønarlagið ikki er verri enn aðrastaðni. Tá hýrur verða samanbornar við hýrur í øðrum londum, má havast í huga, at lønarlagið sum heild er munandi hægri í Noregi og Danmark, enn her hjá okkum. Stórur munur er eisini á inntøkumøguleikunum hjá teimum ymisku skipabólkunum, og lønarspreiðingin er rættuliga stór. Her eigur at vera nevnt, at persónligar avtalur eru rættuliga vanligar; tá er talan um, at einstaklingar samráðast um sína løn. Sáttmálalønin er eitt slag av minstuløn. Søfartens Ledere í Danmark hevur kannað lønarlagið og hevur staðfest, at stórur munur er millum inntøkuna fyri sama starv. Vit hava fingið innlit í hesa lønarkanning.

Her hjá okkum fáa flestu navigatørar meir enn sáttmálalønina. FSN hevur onki ímóti at goldið verður meiri í hýru. Tað ræður kortini um, at fylgja væl við, at alt ov stórur munur ikki verður ímillum persónar, sum gera sama arbeiði.

## Nógv skip skulu undir føroyskt flagg

Nú inntøkurnar hjá landshúsarhaldinum eru nógv minkaðar, serliga orsakað av minkandi fiskiskapi, er politiski viljin, at nýggjar inntøkur skulu koma frá eini kappingarførari FAS skipan. Um hetta fer at eydnast, so fáa føroyskir sjómenn fleiri vinnumøguleikar. Føroya Skipara- og Navigatørfelag vil viðvirka á allan hátt, at hetta skal eydnast.

Tó vilja vit ávara ímóti, at allar hurðar verða latnar upp á víðan vegg. Tíverri vita vit, at nógvir óseriøsir luttakarar, eru í altjóða sjóvinnu.

Tað skal meir enn eitt føroyskt flagg á hekkuna, fyri at skapa eina sjóvinnu. Allar fortreytir eru til staðar, at reka veruligt



reiðarí/shipping virksemi her í Føroyum. Allir partar í vinnuni mugu stimbra hesi tilgongd.

Felagið hevur verið við til at stovna Maritimt Forum. Hetta er ein áhugafelagsskapur, sum hevur til endamáls at økja um áhugan fyri Shipping-vinnuni í Føroyum. Felagið metur, at tað hava stóran týdning at fakfeløg, reiðarar og onnur áhugaði kunnu samstarva um tey viðurskifti, sum vit eru samd um.

## Bjarging av Smyril Line

Nakað av orðaskifti hevur verið um tað var rætt av Løgtinginum at bjarga Smyril Line undan húsagangi. Fakfeløg hava eisini blandað seg uppí orðaskiftið. Føroya Skipara- og Navigatørfelag tekur ikki støðu til politisk mál, men vit fegnast um, at hesi arbeiðspláss eru varðveitt. Útlendsk flutningsfeløg eru seinastu árini, komin inn á føroyska marknaðin, og tað hevur ikki bara verið til gagns fyri føroyska sjómannin.

## Samlagstrygging

Manningarfeløgini hava síðan ár 2000 havt eina felags samlagstrygging fyri limir sínar. Fiskimannafelagið hevur nú tryggja sínar limir hjá ALKA í Danmark. Sum skilst, so er hendan avgerð tikin av fakfelagspolitiskum orsøkum. Henda avgerð ávirkar okkara trygging rættuliga nógv, tí limirnir í FF eru í miðal 13 ár yngri, enn restin. Kostnaðurin hækkar 6%, hvøja ferð miðalaldurin hækkar við einum ári. Feløgini, sum nú eru eftir í skipanini, kannaðu møguleikarnar hjá fleiri tryggingarfeløgum, tá fortreytirnar broyttust so nógv. Vit valdu at gera sáttmála við LÍV, um eina trygging, har útgjaldið við deyða er 700.000,- kr. við 50 ára aldur. Upphæddin lækkar við 25.000,- kr. fyri hvørt ár. Útgjaldið við hættisliga sjúku er nú 100.000,- kr. Frítíðar vanlukkutryggingin er ikki við longur. Kostnaðurin er nú 290 kr. um mánaðin.

Feløgini hava kannað møguleikan fyri at hava eina lokaupphædd, sum part av samlagstryggingini. Aldursbýtið hjá okkum hevði gjørt, at ein lokaupphædd hevði verið sera kostnaðarmikil. Royndirnar hjá øðrum, sum hava lokaupphæddina við, eru, at er ein fyrst byrjaður, so ber ikki til at gevast aftur. Øll sum hava goldið inn hava sjálvandi rætt til útgjald. Tey sum hava verið við, áðrenn lokaupphæddin er sett í verk, kenna seg snýttan. Vit mugu heldur fáa gjørt okkurt munagott á eftirlønaruppsparingina, serliga fyri fiskiskipini.

## Limaskapur og limagjøld

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur altíð mælt føroyskum navigatørum, sum sigla í útlondum, til at vera limir í fakfelag, har sum skipið hoyrir heima. Hetta er serliga galdandi fyri Norðanlond, sum hava vælvirkandi feløg og arbeiðsmarknað. Føroyskir navigatørar sigla eisini við skipum úr øðrum londum og við skipum undir hentleikafløggum. Felagið vil gjarna bjóða hesum limaskap hjá okkum, sjálvt um vit ikki hava samráðingarrætt fyri hesi størv. Felagið kundi brúkt okkara millumlanda kontaktir, til at hjálpt hesum limum, tá trupulleikar taka seg upp. Sum nú er, hava vit bert limir, sum vit hava sáttmála fyri, og hvílandi limir. Nevndin hevur eitt tilmæli til aðalfundin, um lógarbroyting í § 7, um limagjøld.

## IFSMA

International Federation of Ship Master´s Associatiotions, er ein altjóða felagsskapur fyri skipsførarar. Her verður serligur dentur lagdur á at arbeiða fyri øllum viðurskiftum hjá skipsførarum. Felagsskapurin hevur stóra ávirkan á altjóða sjóferðslupolitikkin. Tey mál, sum eru nógv frammi nú, eru millum annað sjórán og rættartrygd. Lat okkum nevna her, at forsetin í IFSMA er sviin Christer Lindvall, sum fleiri ferðir hevur verið í Føroyum á Nordisk Navigatørkongress. Felagið hevur nú fingið limaskap í IFSMA. Vit hava teknað okkum fyri 100 skipsførarar.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag fær neyvan stórvegis ávirkan á altjóða sjóferðslu, men tað hevur týdning at verða við og fáa kunning um tað, sum hendir. Føroyskir sjómenn ferðast um øll heims-

# Samstarvsavtala við Søfartens Ledelse



Føroya Skipara- og Navigatørfelag og danska felagið „Søfartens Ledere“ hava undirskrivað eina samstarvsavtalu, sum hevur til endamáls at styrkja samstarvið millum feløgini.

Avtalan hevur eisini til endamáls at tryggja, at allir sáttmálar, sum feløgini gera, kunnu sigast at vera á sama støði, tá talan er um løn og setanarviðurskifti; hetta er galdandi bæði fyri yvirskipað viðurskifti og persónligar sáttmálar.

Samstarvið er nú eisini skipað á tann hátt, at Føroya Skipara- og Navigatørfelag kann veita føroyingum, sum eru limir í Søfartens Ledere tænastur, á sama hátt, sum Søfartens Ledere kann veita føroyskum yvirmonnum tænastur fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

*Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, og Peer B. Brandenborg, formaður í Søfartens Ledere, skrivaðu undir avtaluna 17. mars 2009.*

høvini, og hvør veit, áðrenn vit vita av, kunnu vit hava brúk fyri einum felagsskapi sum IFSMA.

## Samstarvsavtala við Søfartens Ledere

Stórt tal av føroyskum navigatørum sigla í danska handilsflotanum. Nógvir av hesum eru fyrrverandi limir hjá okkum. Felagið fær javnan fyrispurningar frá teimum um ymisk viðurskifti. Hesi eru millum annað skatta- og almannamál, spurningar um útbúgving og vinnubrøv. Vit vilja sjálvandi hjálpa eftir førimuni. Danska Navigatørfelagið, sum nú eitur “Søfartens Ledere”, hevur 203 virknar limir, sum búgva í Føroyum. Tað kann verða torført at meta um, hvussu nógvir føroyskir navigatørar sigla undir DIS, men eitt tal uppá 500 er nokk ikki av leið. Hetta sigur okkum, at nógvir ikki eru limir í fakfelag, og soleiðis spæla fríspæl, og fáa fyrimunirnar av, at onnur gjalda fyri at hava ein skipaðan sáttmála.

Søfartens Ledere hevur umleið 3.000 limir. Mett verður, at 80% av øllum navigatørum eru limir í fakfelagnum.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Søfartens Ledere hava seinastu tíðina arbeitt við at gera eina samstarvsavtalu, sum skal gagna limunum í báðum feløgunum.

## Avbjóðingar og framtíðin

Fíggjar- og búskaparkreppa, merkja orðaskiftið nógv um dagarnar. Fiski- og Sjóvinna hava ígjøgnum allar tíðir verið noyddar at tillaga seg nógv til skiftandi umstøður. Limir okkara hava ein stóran fyrimun fram um mong onnur. Teir eru rættuliga mobilir, og kunnu lættliga søkja sær hýru í øðrum londum og soleiðis forsyrgja sær og sínum, hóast vinnumøguleikarnir eru skerdir heima hjá okkum. Stórar peningaupphæddir koma soleiðis til okkara samfelag.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag sær tað eisini sum sína uppgávu at virka fyri áhugamálunum hjá teimum, sum sigla í øðrum londum.

Føroysk fiskivinna hevur stórar avbjóðingar fyri framman. Vit kunnu óivað øll læra av teimum mistøkum, sum gjørd eru. Heldur enn at geva nøkrum skuldina, vilja vit í felag líta frameftir, og viðvirka til loysnir og frambrot, sum gagna okkum øllum.

# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagn



Støðan hjá parti av okkara fiskiflota er ikki góð. Fleiri skipabólkar eru í tungum sjógvi; heimaflotin tikist at vera ringast fyri. Tær avrokningar, sum vit í Maskinmeistarafelagnum síggja fyri línuskip eru sera vánaligar, so útlitini eru ikki góð.

Oljukreppa var eisini ein stóran part av 2008, og førdi hetta millum annað við sær, at býtisprosentið bleiv lækkað 1 % fyri lemmatrolarar restina av sáttmálaskeiðinum.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag boðaði tíðliga í 2008 frá , at nú skuldi talvur vaskast reinar og nýhugsan skuldi til. Fyri at fáa ein dialog um hettar, gav Maskinmeistarafelagið Reiðarafelagnum eitt uppskot, sum í stuttum gekk út uppá at sjónarmiðið, har bæði partbýtissáttmálin øðrumegin og sjónarmiðið um fasta inntøku kundu samansjóðast.

Hugsanin hjá okkum er at gera eina fastlønarskipan "omaná" verandi sáttmála, Í høvuðsheitinum verður tá talan um eina tryggjaða minstuhýru við eftirlønarskipan, eina 1 til 1 skipan og helst tryggari setanarviðurskifti. Partsbýti kemur so inn í myndina, tá góður fiskiskapur gevur meira enn áðurnevndu tryggjaðu minstuhýrur.

Tað kom ongin reaksjón frá Føroya Reiðarafelag. Reiðarafelagið boðaði so frá í november, at sáttmálin bleiv uppsagdur til 1. jan. 2009.

## Eftirløn

Maskinmeistarafelagið hevur til hesar samráðingar givið eftirlønarspurninginum fyrsta prioritet. Vit mugu rokna við, at politiska skipanin fer at krevja, at fólk sjálvi skulu spara upp til eftirløn, og um feløgini ikki fáa hetta í lag, so verður tað kroyst niður yvir okkum.

Uppskotið frá yvirmannafeløgunum var so at broyta daggjaldið hjá reiðarum upp á 30,- kr. um dagin til eitt prosentgjald, sum svarar til 35,- kr. um dagin, meðan limirnir sjálvir gjalda 4 % av hýruni til eftirløn. Soleiðis hevði man fingið eina byrjan, har eftirlønargjaldið var 5,5 % av hýruni.

Vit royndu at greiða Reiðarafelagnum frá, at tað er vanligt innan allan arbeiðsmarknaðin, at eftirløn verður goldin sum prosentgjald og tað er eisini rættast at gjalda nógv til eftirløn, tá ið inntøkan er góð, meðan minni verður goldið, tá ið inntøkan er vánalig.

Tað tóktist sum um Reiðarafelagið skilti hetta, men teir gingu kortini ikki við til annað enn 35,- kr. pr. mann pr. dag. Teir vildu tó ganga við til harafturat at draga 4 % av hýruni og senda alt eftirlønargjaldið (35,- kr. + 4 %) til eina eftirlønarskipan hjá LÍV. Herviðhava vit so hóast alt fingið eina byrjan upp á eina veruliga eftirlønarskipan.

Ásannandi tað út av lagi vánaligu støðuna hjá fiskiflotanum, vóru ongar aðrar broytingar gjørdar í sáttmálanum og sáttmálin heldur tí fram til 1. januar 2010. Semja millum FR og MF varð undirskrivað tann 16. februar.

## FAS/Farmaskipasáttmálin

Hesin sáttmálin bleiv uppsagdur til at fara úr gildi 1. januar 2009. Í sambandi við ta lógarbroyting, sum kom í gildi 1. januar, har sjómenn skulu gjalda 35 % í skatti og reiðaríið fáa eina afturbering uppá 35%.

Vit gjørdu nakrar útrokningar av, hvussu lógarbroytingin ávirkar lønirnar og vísti tað seg, at lønir lægri enn 35.000 kr. um mánaðin fáa ein hægri skatt enn áður. Vit hava saman við hinum sjómannafelagnum verið á fundi við vinnumálaráðharran og FAS-stjóran og tosa um støðuna, bæði viðvíkjandi skatti og við ALS.

Tann fyrsti samráðingarfundurin við Reiðarafelagið fyri Farmaskip var fyrst í januar 2009 og vóru MF, FSN, FMPF og FF samd um eitt felags upplegg til henda fund. Tað hava síðani verið fleiri fundir, men tað hevur gingið sera striltið. Á fundi tann 18. februar bleiv greitt at Fiskimannafelagið ikki framhaldandi var partur av samráðingarnevndini. Síðan hava MF,

FMPF og FSN hildið fram saman, og er tað gjørd ein ávegis semja og tað líður væl at gera ein endaligan sáttmála.

## GA/APK

Vit hava verið í Grønlandi og haft fund við GA og Polar Seafood. Reiðarin hjá Polar Seafood var ikki sinnaður at gera nakran sáttmála við MF, men teir søgdu, at teir stórt sæð fylgja APK sáttmálanum. Teir í GA vóru meira positivir og fingu vit fundarboð frá GA um at møtast í Íslandi í samband við fiskarímessuna, sum var har í vár. Vit møttu, men har vóru ongi umboð frá GA, men vit fingu tó eitt gott prát við umboð fyri Royal Greenland.

Tað tykist at vera sera trupult at fáa nakrar avtalur gjørdar. Tað er sum viljin ikki er so góður í hinum endanum. Vit hava eisini haft fund við reiðaran á Polar Princess um avtalu, men heldur ikki her er gjørd nøkur avtala, Vit royna tó at hava ein positivan dialog við teir allar. Men tað er trupult tá viljin ikki tykist, at vera til staðar.

## SEV-IRF

Hesir sáttmálar eru galdandi til oktober 2010. Høvuðsbroytingin undir síðstu samráðingum var tann, at maskinmeistarar hjá SEV/IRF og almennum størvum á landi, nú verða løntir eftir somu lønartalvu.

## Strandfaraskip Landsins

Hesin sáttmálin er eisini galdandi fram til oktober 2010. FMR ynskti undir seinastu samráðingunum, at ein fastlønarskipan varð gjørd við SL. Starvsmannafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag hava í dag fastlønarsáttmála við SL.

Tað vildi Maskinmeistarafelagið ikki gera undir sáttmálasamráðingunum, tí vit mettu, at hetta var so umfatandi, at tað mátti orðast í sáttmálaskeiðnum. MF tók síðani fund við limir, sum starvast hjá SL og fingu vit valt tveir álitismenn - ein fyri Smyril og ein fyri hini skipini. Tað hava



verið 5 til 6 fundir millum MF, SL og lønardeildina og hava álitismenninir verið við til hesar samráðingar. Tað hevur víst seg, at tað eru serliga tveir spurningar, sum í løtuni skilja partarnar, og eru tí hesar samráðingar fyribils lagdar á ís.

## Útlendskir sjómenn við føroyskum skipum

Í 2008 eru vit komnir at kenna skipanøvn sum Orion og Topaz. Málið viðvíkjandi Topaz trúu vit bleiv loyst við at íløgufelagið hjá LÍV, Royndin, átók sær at gjalda løn og heimferð.

Orion var eitt dømi um føroyskt reiðari, sum ikki rindar mánaðarlønina til tíðina, og til endans helt uppat við at gjalda. So gongur tíðin og reiðarin letur standa til og fortelur fólki, at pengarnir koma um nakrar dagar. Maskinmeistarafelagið fór inn í hettar mál, hóast maskinmeistarin ikki var limur í Maskinmeistarafelagnum. Nevndin metti, at felagið hevði eina moralska skyldu at taka sær av maskinmeistarum, sum eru komnir soleiðis fyri orsakað av, at ein føroyskur reiðari ikki heldur sínar skyldur.

Vit eru vitandi um at maskinmeistarar, sum eru farnir heim uttan at hava fingið sínar hýrur. Hvussu blívur við hesum lønareftirstøðum vita vit ikki, men vit hava boða teirra agentum frá, at vit ikki fara at viðgera hesi mál, tá hesir menn ikki eru limir hjá okkum.

Um jólini hoyrdist so aftur um trupulleikar við Topas, og nú fyri stuttum hevur málið aftur verið frammi. Hetta er eitt ótrúliga keðiligt mál, men MF ferð ikki at blanda seg í hetta.

## Framtíðar eftirlønarskipan

Fyri einum trimum árum síðanI setti táverandi landsstýrið, ABC-samgongan, ein arbeiðsbólk til at gera eina framtíðar eftirlønarskipan. Endamálið var at skipa viðurskiftini soleiðis, at vit fáa eina fíggjarliga haldbara eftirlønarskipan, ið tryggjar øllum ein virðiligan og góðan aldurdóm.

Hesin arbeiðsbólkur hevur framlagt

sítt álit, men enn er hetta ikki endaliga lagt fram til hoyringar. Kortini kann sigast, at tilmælið gongur út uppá, at allir borgarar gjalda 15 % av øllum lønargjaldingum frá 2018 og, at minst 10,5 % skulu fara til eftirlønaruppsparing.

Skattafrádráttur verður bert veittur fyri inngjøld til ratueftirlønir og lívlanga veiting. Skattafrádráttur verður ikki veittur fyri inngjøld til kapitaleftirlønir.

## Samlagstrygging

Fiskimannafelagið boðaði í heyst frá, at teir fóru úr LÍV, og vildu flyta sínar tryggingar til Alka har limirnir í Samtak hava sínar tryggingar. Maskinmeistarafelag boðaði frá, at vit ikki vildu flyta pengar av landinum og at felagið metti eisini, at man fekk eins góðar treytir hjá føroyskum veitarum. Sáttmálin við LÍV bleiv sagdur upp, og biðið bleiv um nýtt uppskot til samlagstrygging frá Lív og Betri Pensjón har FSN og MF vóru í samstarvi.

Tað bleiv til einar 5 til 6 fundir við tryggingarfeløgini. Samanumtikið kann sigast, at ikki stórvegis munur var á tilboðunum og nevndin samtykti á fundi 19. desember 2008 at halda fram hjá LÍV. Kostnaðurin er nú farin frá 240,- kr. um mánaðin til 290,- kr. um mánaðin. Útgjald við deyð er 700.000,- kr. við 50 ár og fellur við 25.000.- kr. um árið fram til 67 ára aldur. Útgjald við hættisligar sjúkur er nú 100.000,- kr. og frítíðarvanlukkutryggingin er fallin burtur.

Samstundis verða inngjøldini nakað umskipað soleiðis, at eftirlønargjøld og tryggingargjøld fara inna á eina og somu kontu. Mett verður, at hetta fer at gera skipanina lættari at umsita og at tryggja, at gjøldini altíð koma inn.

## Maritimt Forum

Maskinmeistarafelagið er limur í felagsskapinum Maritimt Forum, hvørs endamál er at verða kveikjari fyri føroyska shipping vinnu, bæði á sjónum og á landi soleiðis, at henda vinnan við tíðini kann gerast eitt gott ískoyti til tann føroyska samfelagsbúskapin.

Vit meta eisini, at tað hevur stóran týdning at øll, sum vilja hesi vinnu væl, samstarva. Miðað verður eftir, at vit í 2015 í Føroyum hava eina shipping vinnu, sum í dagsins pengum (2008) hevur eina valutainntøku til samfelagið, sum svarar til 2 milliardir krónur

## Vinnuháskúlin

Støðan á Vinnuháskúlanum er ikki góð, men vit kunnu byrja við tí positiva, og tað er, at næmingatalið á skúlanum er vaksandi. Tá ið næmingatalið veksur, so fær skúlin sjálvandi tørv á fleiri undirvísingarhølum og hægri fermetratali. Tí var tað keðiligt at frætta, stutt eftir at tann nýggja samgongan var skipað, at ætlanin hjá landsstýriskvinnuni í mentamálum er at taka ovastu hædd á skúlabygninginum við Krákugjógv til annað endamál. Hetta vísir greitt eina manglandi vitan hjá MMR um maskinmeistaraútbúgvingina. Sum kunnugt, so er hesin bygningur innrættaður við júst teimum hølum og serútgerð, sum er neyðug til útbúgving av maskinmeistaranum.

Eftir okkara metingum verður í framtíðini støðugt brúk fyri at tillaga og útbyggja hølir til tann serstaka tørvin, sum undirvísing á Vinnuháskúlanum krevur. Tí vóna vit, at ætlanin verður endurskoðað. Tá nýggja fíggjarlógini bleiv løgd fram sást, at játtanin til Vinnuháskúlan var nógv skerd. Tað koma at mangla tvær milliónir til rakstur og stjórin boðaði frá, at tað verða ikki tiknir næmingar inn í ár til maskinistútbúgvingina og, at flokkar skuldu leggjast saman.

Samlestur kann verða góður, men er treytin tá, at alt verður tikið við. Eftir míni meining eru tað ikki øll fak, sum eru egnaði til samlestur. Man skal ansa sera væl eftir, at útbúgvingarnar ikki flata út og harvið missa síni eyðkenni.

Tað ávirkar støðið á útbúgvingunum og tí má man verða sera varin við ikki at leggja ov nógv saman. Ungfólk sum í dag fara undir útbúgving kanna hvørjum støði útbúgvingin er á, áðrenn tey velja útbúgvingarstað. Á DTU er maskinmeistaraútbúgvingin nú á bachelor støði; har ganga fleiri føroyingar, helst av somu orsøk.

Í Útbúgvingarráðnum hjá skúlanum eru umboð fyri feløgini og ta vinnu, sum hevur tørv á hesum næmingum, tá ið teir hava fingið síni prógv. Tá átti málið at veri tikið upp í Útbúgvingarráðnum.

Málið um Vinnuháskúlan hevur eisini verið til viðgerðar í Løgtinginum og fleiri tingmenn vóru sera ónøgdir við handfaringina. Onkur av tingmonnunum mælti landsstýriskvinnuni í mentamálum til at rudda upp í leiðsluni á skúlanum.

Nú tað fer at nærkast teimum 5 árunum síðani samanleggingina, er tíðin komin til at gera eftirmetingar av skúlanum og yvirskipaðu leiðsluni til frama fyri teir næmingar, sum vónandi koma at ganga har í framtíðini. Tað kundi eisini verið áhugavert at vita, um hesin samanlagdi skúli fór at hava eftirútbúgvingar fyri maskinistar og maskinmeistarar. Vit meta eisini at tørvur er á eftirútbúgvingarmøguleikum á Vinnuháskúlanum.

## Bjarging av Smyril Line

Vit fingu áheitan frá Samtak um felags mótmæli saman við øðrum feløgum. Vit sendu eitt skriv til flestu feløgini, har vit svaraðu, at Maskinmeistarafelagið ikki tók støðu til slík mál og vístu til lógir felagsins. Vit vístu á, at útlendsk feløg, sum sigla upp á Føroyar, ikki tykjast vera sinnaði at gjalda tann kostnað, sum er av at brúka føroyska manning við teirra skipum. Hesir reiðarar velja heldur at brúka bíliga útlendska manning, sum ikki er sett eftir føroyskum sáttmálum.

Okkum kunnugt er øll tann fasta manningin umborð á Norrønu føroysk, og verður lønt samsvarandi føroyskum sáttmálum.

## NMF

Her hava vit verið til tveir fundir í Norðurlendska felagskapinum NMF, – ein í Stokkhólmi og ein hjá Metal Søfart í Keypmannahavn. Á fundinum í Keypmannahavn tóku vit upp spurningin um teir mongu maskinmeistararnar, ið sigla við norskum og donskum skipum. Her kundu vit hugsað okkum at verið meira aktivir soleiðis, at vit eisini kunnu umboða teir, sum búgva í Føroyum. Tað eru til dømis bert millum 60 til 70 føroyingar í Maskinmesterforeningen. Hetta skal takast upp aftur á komandi fundi í NMF.

# Ongin má gerast sjúkur av sínum arbeiði

Týskvøldið 12. mars var framløga í Miðlahúsinum av nøgdsemiskanning, sum Skipaeftirlitið og Fiskimannafelagið hava gjørt í felag.

Lat okkum fyrst siga, at tað er sera gott, at henda kanning er gjørd. At kanningin vísir manglandi trygdarvenjingar umborð á skipum okkara, kemur helst ikki óvart á tey, ið arbeiða í hesa vinnu.

Stjórin í Skipaeftirlitinum vísti á, at tað er skiparin, sum hevur ábyrgdina av, at trygdarvenjingar eru.

Er málið so einfalt, kunnu vit spyrja.

Sjálvur haldi eg, at tað hevði verið gott at viðgjørt fleiri spurningar um persónliga trygd umborð. T.d. eiga vit at spyrja um menn brúka trygdarskógvar, oyraverju, verndarbrillur og hjálm - har tað er neyðugt?

Vit eiga eisini at fáa greiðu á um fólk eru kunnað um, hvørji kemisk evni eru í t.d. vaskievnum, og hvør vandi liggur í hesum. Og soleiðis kundu vit hildið á.



Tað, sum er mest umráðandi er at fáa greiðu á, hvussu nógv fólk koma til skaða umborð á føroyskum skipum, og hvørjir eru teir mest vanligu skaðarnir.

Tað vil siga, at skulu munagóðar ábøtur gerast so er neyðugt at fara undir at skráseta tær vanlukkur, sum henda. Burtur úr skrásetingum fáa vit hagtøl, sum koma at siga, hvar teir størstu trupulleikarnir eru, og hvar tað er mest umráðandi at fáa bøtt um støðuna.

Lat okkum her nevna, at kanningar hava víst, at tá arbeitt verður í vaktum kunnu fleiri trupulleikar taka seg upp – t.d. troyttheit, dølskni og líkasæla. Tá er sjálvandi vandi á ferð.

Tað sum er umráðandi er, at vit seta okkum sum mál, at "ongin má blíva sjúkur av sínum arbeiði". Henda hugburð mugu vit eisini fáa umborð á øll føroysk skip.

Lat okkum at enda takka Skipaeftirlitinum og Fiskimannafelagnum, fyri kanningina, sum tey hava gjørt.

Vónandi verður arbeitt víðari við hesum máli.

*Páll Hansen formaður*
Maskinmeistarafelagið

# Nú kreppan herjar



ALHEIMS BÚSKAPARKREPPAN hevur eisini rakt føroyska fiskivinnu. Prísurin á toski og hýsu er farnir niður í helvt, inntøkur fiskimanna eru lækkaðar samsvarandi, við línuskipunum eru mest sum bert minstulønartúrar. Aðrir skipabólkar merkja eisini nógv lækkaðu fiskaprísirnar, hesir eru, flakatrolarar, garnaskip, og smærru trolbátarnir. Vit fáa nokk einki gjørt við støðuna, vit mugu bert vóna, at útlitini batna aftur skjótt.

HJÁLPARPAKKAR verða latnir kreppuraktum vinnulívi í okkara grannalondum. Higartil hava vit onga ábending fingið um nakra hjálp til okkara høvuðsvinnu, heldur tvørtur ímóti. Ætlanir eru um at skerja inntøkutrygd fiskimanna munandi. Tað kann tykjast løgi, at lagt verður eftir inntøkutrygdin, nú mest er brúk fyri henni.

SKATTAFRÁDRÁTTURIN hjá fiskimonnum kemur javnan fram, tá orðaskiftið er um hallið hjá landshúsarhaldinum. Løgmaður er endurgivin fyri at siga, at hesin møguleiki eisini verður kannaður. Vit kenna øll alt rumblið, hvørja fer okkurt skal sparast á øðrum økjum í samfelagnum. Tað gongur bert stutt tíð so, eru spariætlaninar sleptar, og ein eykajáttan hevur loyst trupulleikan.

FISKIVINNAN merkir kreppuna sváraast av øllum, og tað er nokk hon sum skal føra okkum ígjøgnum kreppuna. Tískil er onki høpi í, at leggja meinbogar í vegin, nú harðast leikar á.

*Eyðstein Djurhuus formaður*
Føroya Skipara- og Navigatørfelag


herning shipping

herning shipping as driver international rederi- og mæglervirksomhed og disponerer over 40 tankskibe.

Rederiet beskæfter ca. 400 medarbejdere – 350 til søs og omkring 60 i administrationen i Danmark, Frankrig og Singapore.

Rederiet har godkendt kvalitetsstyringssystem til ISO 9001, ISO 14001, ISM, GMP + HACCP samt OHSAS 18001.

Alle certifikater er udstedt af Lloyds Register Quality Assurance for såvel skibe som administrationen.

herning shipping a.s., Theresavej 1, 7400 Herning
Tlf. 9626 6666 dk@herning-shipping.com www.herning-shipping.com

# Rock og Rock Trawldoors

MIÐ & MAGN hevur hitt Hans J. Joensen, sum er stjóri í smápartafeløgunum Rock og Rock Trawldoors.

Vit hava frætt, at feløgini hava nógv nýtt á tekniborðinum, men spyrja fyrst stjóran, hvussu fyritøkan byrjaði. Hans greiðir nú frá, at sp/f Rock varð stovnað 1. oktober 2004, og nevnir, at teir, sum stovnaðu felagið høvdu allir mist pening í Injector International og Injector Door, sum bæði vóru farin konkurs frammanundan.

Endamálið hjá smápartafelagnum Rock er at gera og levera jarn og stálvørur til trolaraflotan harímillum umvæla og gera trollemmar.

Byrjanin var trupul, men fyrsta árið royndist kortini hampiligt, og síðani hevur gingið framá, greiðir hann frá.

Tá so felagið eisini fór at seta pening í annað enn lemmaframleiðslu og aðrar jarnvørur til trolara- og garnaflotan, varð sp/f Rock Trawldoors stovnað; tað var á sumri 2007.



## Flótitrolslemmar

Hans greiðir nú frá, at á sumri 2006 komu teir á marknaðin við einum nýggjum modelli av flótitrolslemmum, sum vóru royndir umborð á Enniberg. Hesir lemmarnir vístu seg beinanvegin at rigga væl.

Síðani hava fleiri fingið sær hetta slagið og nevnast skal, at Finnur Fríði, sum fiskar svartkjaft á djúpum vatni og eftir sild og makreli, heilt uppi undir vatnskorpuni; siga seg vera sera væl nøgdar.

Á heimasíðuni hjá felagnum – www.rock.fo – eru fleiri sera jaligar viðmerkingar frá royndum skiparum.

- Í november 2006 komu vit á marknaðin við einum modelli av botntrolslemmum, sum vit hava kallað Super-Shark ella bara Rock-lemmar. Hetta modellið er nú roynt í øllum londum í Norðuratlantshavi, og hevur fingið sera góð ummæli frá øllum, sum hava roynt lemmarnar.

Á Rock Trawldoors hava verið upp í 19 fólk í arbeiði, meðan talið í dag liggur á 13 arbeiðsplássum.

Eftir ordralistanum hava vit fult arbeiði fram til ½ apríl. Stálprísirnir, sum fóru til skýggja, seinasta summar, eru nú komnir niður aftur á tað støðið, sum teir lógu á í 2006 og fyrru helvt av 2007, so hetta lættir eitt sindur um útreiðslurnar.

## Rullandi vektir

Fyrst í 2008 fóru vit í holt við at gera rullandi vektir til partroling. Hetta projektið varð stuðla av Vinnuframagrunninum.

Vit gjørdu fyrst tvær rullandi vektir og royndu hetta umborð á einum pari. Tað vísti seg skjótt, at hetta riggaði sera væl og skiparafrágreiðingarnar vísa, at teir fóru frá eini oljunýtslu uppá 124-126 litur pr. tíma niður á 98-104 litur pr. tíma. Eisini vísa tølini hjá reiðarunum yvir bunkringar, at nógv var spart teir túrarnar, sum rulluvektirnar vóru umborð.

Tá vit fyrstu ferð spurdu um vektirnar á verandi ketuvektum, fingu vit at vita, at tær vigaðu 1.700 kg. og tí vóru okkara rullandi vektir eisini gjørdar 1.700 kg.

Men tá vit fóru undir at gera veruligar royndir sóu vit, at vit høvdu fingið skeivar upplýsingar. Tá vit so fóru at kanna ketuvektirnar vigaðu tær 2.100 kg. Tað vísti seg eisini, at tá skipini royndu har nógvur streymur var, høvdu vektirnar hug at lyfta seg upp frá.

Annars gingu tær sera væl, og tað kom ikki fyri, at tær vendu sær á ella koppaðu runt.

Síðani varð roynt at tyngja vektirnar við at leggja meira vekt á tað horisontalu festisplátuna, og nú gingu tær fast nokk. Men nú hendi tað av og á, at vektirnar fóru á ryggin og tað komst av, at tyngdipunktið á vektini fór einar 10 cm. uppyvir, tá vit løgdu eyka vektir á.

## Stórar íløgur

Tað kostar nógvan pening at gera slíkar kanningar, vit mugu gjalda skipum og øðrum, sum taka lut í slíkum royndum. Vit hava nú – saman við øðrum – søkt um stuðul til at gera endaligar royndir við hesum rullandi vektunum og til tað hava vit eisini fingið játtað pening frá Fiskivinnuroyndum.

Tann meirvekt, sum varð løgd á í erva, verður tikin av og síðani verður tilsvarandi vekt løgd inn á hjólini fyri at fáa balansuna uppá pláss.

Vit hava tosað við Bjarta Thomsen á

# í Vági hava úr at gera

Fiskirannsóknarstovuni um at fáa kannað gongdina á botni við sjókaga. Hetta kann geva okkum ábendingar um víðari útbygging og/ella umbygging av vektunum. Um vit fáa hesar rullandi vektirnar at ganga nóg stabilt, kunnu vit seta scanmarhaldara á vektirnar. Á tann hátt kunnu skipini alla tíðina síggja frástøðuna millum vektirnar. Tann innbygdi dýbdarmálarin sigur frá, um vektin hevur hug at lætta sær á. Hetta verður ein stór hjálp, tá tað rekur hart.




## Partrolarar spara 15-20%

Miðað verður eftir, at partrolarar koma at spara 15-20 % av oljuútreiðslunum. Hetta fær minni ávirkan á botnumhvørvið, so nógv er vunnið fyri allar partar.

Í hesum sambandi kundi eg nevnt, at vit hava ymiskt annað nýtt á tekniborðinum, har persónar – saman við Rock Trawldoors – eru við at menna ymiska útgerð í sambandi við oljusparing. Men enn er ov tíðliga at siga so nógv ítøkiligt um hesar royndir. Vit rokna kortini við, at hetta verður greitt, tá fleri royndir eru lidnar seinni í ár.






# »Eg havi innlit í míni útlit«

Mær nýtist ikki at stúra. Hvørki fyri mær sjálvari, makanum ella børnunum.

Snýr tað seg um lívstrygging, óarbeiðsføristrygging ella eftirløn, fært tú altíð bestu ráðgevingina frá Lív. Vit taka støði í tínum tørvi.

Við Lív fært tú innlit í tíni útlit.

Innlit í útlit

www.liv.fo